| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>28. november 2024 | Blað nr.: 1163 |
| | Formansins merki: |

# GERÐABÓK

**Dato:** 28. november 2024 **Kl**. 16:00
**Stað:** Býráðssalurin
**Málsnr: 283/24 – 297/24**

**FUNDARLEIÐARI:**
Heðin Mortensen

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Annfinn Brekkstein
Tróndur Sigurðsson
Kári Johansen
Kristianna Winther Poulsen
Súna Mørk
Elsa Berg
Jákup Dam
Gunvør Balle
Annika Olsen
Birgir Nielsen
Súsanna Olsen
Birita Baldvinsdóttir Iversen

**LUTTÓKU EISINI:**
Eyðna Justinussen
Bogi Jacobsen
Hermann Mortensen
Mortan Simonsen

**LUTTÓKU IKKI:**

**SKRIVARI:**
Jóan Petur Hentze

**PROTOKOLLFØRARI:**
Magnus Dam

**Innihaldsyvirlit** **Síða**

**Til viðgerðar**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 283/24 | 24/09126-1 | Bjørg Dam berst frá at møta á býráðsfundi 28. november 2024 | 1165 |
| 284/24 | 24/00063-1 | Mál beind í nevndir 2024 | 1166 |
| 285/24 | 19/04397-1 | Golfvøllur á Glyvursnesi - byggiverkætlan | 1168 |
| 286/24 | 21/04429-1 | Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Hest | 1176 |
| 287/24 | 24/00965-1 | Dátuvernd og KT-trygd í Tórshavnar kommunu 2024 | 1181 |
| 288/24 | 24/07504-1 | Fíggjarætlan 2025, Tórshavnar kommuna | 1186 |
| 289/24 | 24/08061-1 | Umbøn um eykajáttan av meirinntøkum 2024 | 1199 |
| 290/24 | 16/01798-1 | Móttøka av gróti frá Eysturoyartunlinum | 1202 |
| 291/24 | 22/00638-1 | Víðkan av Skansabryggjuni - útbygging norðureftir | 1206 |
| 292/24 | 23/00611-1 | Bátahylurin í Álakeri - keyp av aldubrótara | 1211 |
| 293/24 | 23/02476-3 | SSL : Fyrispurningur um tillaging av ferjuleguni í Hesti til Erlu Kongsdóttir | 1214 |
| 294/24 | 24/00634-1 | Verjugarður við Vónina - broyting | 1219 |
| 295/24 | 24/01596-1 | Bíðirúm í Hesti | 1221 |
| 296/24 | 24/00061-1 | Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2024 | 1223 |
| 297/24 | 21/03920-1 | Stórhøll | 1226 |

**Til viðgerðar**

## 283/24 Bjørg Dam berst frá at møta á býráðsfundi 28. november 2024

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 28.11.2024 | 283/24 | 24/09126-1 |

**Málslýsing**
Bjørg Dam hevur boðað frá, at henni berst frá at møta til býráðsfundin.

Sambært § 18, stk. 3, í kommunustýrislógini ger býráðið av, at treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi, ið er Birita Baldvinsdóttir Iversen, eru loknar.

**Býráðsfundur 28. november 2024:** Tikið til eftirtektar.

| | Býráðsfundur<br>28. november 2024 | Blað nr.: 1166<br>Formansins merki: |
|---|---|---|

# 284/24 Mál beind í nevndir 2024

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 25.01.2024 | 3/24 | 24/00063-1 |
| 2 Býráðsfundur | 29.02.2024 | 27/24 | 24/00063-1 |
| 3 Býráðsfundur | 21.03.2024 | 51/24 | 24/00063-1 |
| 4 Býráðsfundur | 24.04.2024 | 72/24 | 24/00063-1 |
| 5 Býráðsfundur | 30.05.2024 | 109/24 | 24/00063-1 |
| 6 Býráðsfundur | 20.06.2024 | 142/24 | 24/00063-1 |
| 7 Býráðsfundur | 19.09.2024 | 195/24 | 24/00063-1 |
| 8 Býráðsfundur | 24.10.2024 | 240/24 | 24/00063-1 |
| 9 Býráðsfundur | 28.11.2024 | 284/24 | 24/00063-1 |

**Upprunin til málið**

**Lýsing av málinum**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>28. november 2024 | Blað nr.: 1167 |
| | Formansins merki: |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**

**Býráðsfundur 25. januar 2024:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 29. februar 2024:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 21. mars 2024:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 24. apríl 2024:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 30. mai 2024:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 20. juni 2024:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 19. september 2024:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 24. oktober 2024:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 28. november 2024:** Einmælt samtykt.

# 285/24 Golfvøllur á Glyvursnesi - byggiverkætlan

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 06.11.2019 | 309/19 | 19/04397-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 13.11.2019 | 305/19 | 19/04397-1 |
| 3 Býráðsfundur | 28.11.2019 | 271/19 | 19/04397-1 |
| 4 Mentamálanevndin | 11.03.2020 | 66/20 | 19/04397-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 01.04.2020 | 77/20 | 19/04397-1 |
| 6 Býráðsfundur | 06.04.2020 | 54/20 | 19/04397-1 |
| 7 Mentamálanevndin | 19.10.2020 | 277/20 | 19/04397-1 |
| 8 Fíggjarnevndin | 28.10.2020 | 280/20 | 19/04397-1 |
| 9 Mentamálanevndin | 30.11.2022 | 220/22 | 19/04397-1 |
| 10 Fíggjarnevndin | 07.12.2022 | 297/22 | 19/04397-1 |
| 11 Býráðsfundur | 15.12.2022 | 281/22 | 19/04397-1 |
| 12 Mentamálanevndin | 10.04.2024 | 93/24 | 19/04397-1 |
| 13 Mentamálanevndin | 30.10.2024 | 202/24 | 19/04397-1 |
| 14 Fíggjarnevndin | 06.11.2024 | 268/24 | 19/04397-1 |
| 15 Býráðsfundur | 28.11.2024 | 285/24 | 19/04397-1 |
| 16 Býráðsfundur | | | 19/04397-1 |

**Upprunin til málið:**

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Fyrr í ár varð sáttmáli gjørdur við avvarðandi festara og Búnaðarstovuna um endurgjald og leigu av økið 522.000 fermetur stórt á Glyvursnesi.

Sambært sáttmálanum skulu øll arbeiðir, ið fevnd eru av endurgjaldinum so sum girðingar og nýdyrking, verða avgreidd í seinasta lagi 31. desember 2022. Festarin hevur somuleiðis fullan og óskerdan nýtslurætt til gamla seyðahúsið og maskinhøll, fram til nýggja seyðahúsið við maskinhøll er bygt, tó í seinasta lagi 31. desember 2022.

Festarin hevur longu søkt um byggiloyvi til nýtt seyðahús.

Sambært sáttmálanum § 14,2 áliggur kommununi innan trý ár frá avtaludegnum at prógva fyri Búnaðarstovuni, at arbeitt verður ítøkiliga at gjøgnumføra verkætlanina at byggja golfvøll.

Ætlanin er nú at byrja sjálvt byggimálið, ið hevur sum fortreyt, at golfvøllurin verður bygdur í stigum alt eftir fígging. Í tillagaða verkætlanaruppskotinum frá 2017 varð lagt upp til, at hvørt byggistigið fevnir um trý hol, íroknað lendisgøtur, og at mál í fyrsta umfari er at byggja golfvøll við 9 holum, sum seinni kann byggjast út til fullan vøll 18 hol.

Søkt er um at broyta byggisamtyktina fyri partin av Glyvursnesi, sum fevndur er av golfvøllinum. Hetta er við at koma undir land.

**Verkætlanartilgongd**
Ætlanin er at skipa bólk at fyrireika byggiverkætlanina við umboðum fyri trivnaðarfyrisitingina og teknisku fyrisiting. Harumframt tilnevnir Tórshavnar Golffelag umboð í bólkin.

Ymisk stig eru í hesi fyrireikandi tilgongd.

Í fyrsta lagi er at fáa til vega projekttilfar. Í verkætlanaruppskotinum frá 2017 er lagt upp til projektering og bygging stig fyri stig yvir eitt fimm ára tíðarskeiðl. Design av golfvøllinum við lendisgøtum fyriliggur, men neyðugt at er nágreina hetta bæði viðvíkjandi lendistillagingum, nøgdum av tilfari (sand, mold v.m.), vatnleiðing, dren o.a.

Ætlan er tí at fáa í lag avtalu við golfvallararkitektin um ráðgeving at byggja golfvøll á altjóða støði á Glyvursnesi. Partur av hesum er eisini at fáa til vega útbjóðingartilfar, kostnaðarmeting av anleggsarbeiðinum og tíðarætlan fyri bygging í stigum.

Hetta tilfar er grundarlag fyri umsókn til byggimyndugleikan og friðingarmyndugleikarnar um loyvi at byggja golfvøllin við tilhoyrandi installatiónum.

Hugskot hevur verið, at kaikanturin, sum gjørdur er á Glyvursnesi í sambandi við havnaútbyggingina, kann vera verandi til við tíðini at skapa eitt maritimt umhvørvi til frítíðarafelagsskapir, ferðavinnu v.m. Tórshavnar havn er av friðingarmyndugleikunum áløgd at taka burtur kaikantin, tá liðugt er at taka grót til havnabyggingina. Verandi kaikantur er heldur ikki bygdur til at halda leingi aftrat. At tryggja kaikantin at halda fleiri ár aftrat er kostnaðarmikið.

Í sambandi við byggitilgongdina er ynski, at tilfar til golfvøllin – m.a. mongd av sandi – kann siglast og fáast uppá land um kaikantin, heldur enn at verða koyrt eftir Glyvursvegnum. Kommunan kann søkja friðingarmyndugleikarnar um at leingja loyvið til kaikantin til endamáliðj við golfvøllinum. Spurningur er eisini, um hesin flutningur kann ella skal gerast í nærmastu framtíð, áðrenn kaikanturin ikki longur er nýtiligur.

Ætlanin er eisini at fáa gjørt ymsar vakstrarroyndir úti á Glyvursnesi eitt nú við ymsum grassløgum og at byggja eina *putting green* upp frá grundini.

Hvussu langt hesar fyrireikingar kunnu koma, er tengt at, hvør fígging er til endamálið. Til ber at geva neyvari meting um ráðgevarakostnaðin, tá samráðing hevur verið við golfvallararkitektin. Skal sandur og annað tilfar siglast út til Glyvursnes í nærmastu framtíð, er neyðugt við fígging. At gera ymsar royndir við tilfari og grasi krevur eisini fígging.

Í 2017 varð skotið upp at byggja 9 hol yvir eitt fimm ára tíðarskeið. Mett varð, at miðalkostnaður fyri hvørt holið er kr. 3 mió, tvs. ein samlaður kostnaður uppá kr. 27 mió. Tá varð skotið upp fígging í hesum lutum:

| **Ár** | **Tkr.** | **Arbeiði** |
|---|---:|---|
| 1 | 4.000 | Projektering og snið. Fara undir holini 1-3 |
| 2 | 5.000 | Gera holini 1-3 liðug. Projektering og snið, fara undir holini 4-6 |
| 3 | 9.000 | 3 hol klár at brúka. Gera holini 4-6 liðug. Fara undir holini 7-9. Vatngoymsla. Venjingar-/upphitingarøki |
| 4 | 6.000 | 6 hol klár at brúka. Gera holini 7-9 liðug. Leggja ætlan fyri næstu 9 holini. |
| 5 | 3.000 | 9 hol klár at brúka. |

Felagshús og maskinhøll/tilfarsgoymsla er ikki íroknað.

Umframt kommunala íløgufígging er ætlanin saman við Golffelagnum at kanna møguleikar fyri uttanhýsis fígging bæði innlendis og í altjóða golfumhvørvinum. Í løtuni er fígging á løgukontuni til golfvøllin bert til at fíggja avtalaðu endurgjaldsupphæddina kr. 9.843.016 sambært sáttmálanum um lendið. Kommunan

eigur í hesum sambandi at heita á landsstýrið um at halda avtaluna, sum gjørd er um, at landið ber endurgjaldskostnaðin og kommunan byggir og fíggjar golfvøllin.

Golfvøllurin hevur týdning fyri onnur mál í økinum, eitt nú Glyvursvegurin frá Hamrinum og út á nesið. Talan er í dag um arbeiðsveg, sum einaferð skal gerast samsvarandi vegstandardi.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til:

- at seta fyrireikandi verkætlanarbólk sum omanfyri lýst at fáa til vega uppskot til ráðgevaraavtalu við golfvallararkitekt at leggja aftur fyri nevnd
- at søkja friðingarmyndugleikarnar um loyvi til at brúka kaikantin á Glyvursnesi eftir, at havnabyggingin er liðug, til at føra sand og annað tilfar til golfvøllin
- at senda landsstýrinum áheitan um fígging til endurgjaldsupphæddina
- at játtan til bygging av golfvøllinum verður fingin til vega á íløguætlaninini, og
- at beina málið í fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 06. november 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 13. november 2019:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðsfundur 28. november 2019:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Sambært sáttmálanum um lendi til golfvøll á Glyvursnesi (j.nr. 14/00612) fall fyrsti avdráttur av gjaldinum kr. 2.460.754 til gjaldingar 1. november 2019. Samlaða sáttmálauppæddin er kr. 9.843.016.

Í løgukarminum 5775 Ítróttaranlegg fyri 2020 eru settar kr. 3,5 mió av til golfvallarverkætlanina. Næsti avdráttur uppá kr. 2.460.754 fellur til gjaldingar 1. november 2020. Teir báðir síðstu avdráttirnir fella til gjaldingar ávikavist 1. november 2021 og 1. november 2022.

Leigusáttmáli
Formligi nýtslurætturin hjá kommununi yvir lendinum sambært omanfyri nevnda sáttmála verður staðfestur í leigusáttmála millum kommununa og Búnaðarstovuna. Leigusáttmálin hevur heimild í lógini um landsjørð § 7a. Uppskot til leigusáttmála er nú klárt at samtykkja.

Leigugjald um lendi til almannagagnligt endamál er kr. 5.000 um árið, ið verður prístalsviðgjørd árliga. Uppkrav verður sent hvønn 1. desember, og fyrstu ferð hin 1. desember 2020. Leigusáttmálin er galdandi til 1. januar 2060, tvs., at talan er um leigumál í 40 ár, sum tá kann leingjast.

Matrikuleringsbroytingarnar eru ikki avgreidd enn. Formliga er tí talan um fyribils leigusáttmála. Tá matrikuleru viðurskiftini eru avgreidd, kann avtalan dagførast og tinglýsast.

Sambært sáttmálanum um lendið er tað kommunan, ið skal rinda kostnaðir til matrikulering og tinglýsing. Hesir kostnaðir eru tí ikki staðfestir enn og eru aftrat teimum kr. 9,843 mió nevndar omanfyri.

Byggiverkætlanin
Tøk játtan at arbeiða við sjálvari verkætlanini í 2020 er umleið kr. 750.000. Í langtíðaríløguætlanini er lagt upp til fígging árini 2021-2023 uppá kr. 22,5 mió.

Næsta stig er nú at fáa framleitt neyðugt projekttilfar til myndugleikaviðgerð, harundir eisini friðingarmyndugleikarnar. Ætlanin í ár er eisini at fáa gjørt ymsar vakstrarroyndir við ymsum grassløgum og mold/sand-blandingum.

Gongst væl eisini viðvíkjandi myndugleikaviðgerðini, er mál at byrja byggingina av golfbreyt/holi 1 í ár.

Til byggiverkætlanina er neyðugt at gera ráðgevingaravtalu við golfvallararkitektin.

**Tilmæli:**

Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at:

- góðkenna uppskotið til 40-ára leigusáttmála við Búnaðarstovuna um lendið,
- geva fyrisitingini heimild at samráðast við golfvallararkitektin um ráðgevingaravtalu,
- at játta kr. 3,5 mió av løgukarmi 5775 Ítróttaranlegg ætlað golfvølli til løgukontu L57016 Golfvøllur, og
- at beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Mentamálanevndin 11. mars 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 01. apríl 2020:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 06. apríl 2020:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Verkætlanaruppskotið er nú so mikið búgvið, at til ber at fastleggja golfvallarsniðið og verkætlanarfasurnar, sum tryggja, at til ber at spæla golf samstundis sum bygt verður. Tær tríggjar fasurnar fevna um 9 hol/breytir, gøtusamband v.m., samstundis sum lagt er upp til at kunna vaksa um vøllin til 18 hol við tíðini.

Eftir ætlan verður verkætlanartilfarið sent til myndugleikaviðgerð, harundir byggiloyvi, í næstum, so at útbjóðing av verkætlanini kann fremjast um ársskiftið.

Mett verður skilabest, at tær tríggjar fasurnar verða bjóðaðar út í einum. Fyrimunur við hesum er, at arbeiðstakari er knýttur at verkætlanini, so at vitan um golfvallarbygging ítøkiliga ikki skal fáast til vega av nýggjum fyri hvørja fasu, og at hetta væntandi eisini hevur fyrimun at halda kostnaðinum niðri.

Tilfar íroknað kostnaðarmeting verður løgd fram á fundinum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at fylgja lýstu verkætlanartilgongdini soleiðis, at umsitingin fær heimild til at søkja um neyðugu myndugleikaloyvini, og at verkætlanin eftirfylgjandi kann bjóðast út í innbodnari lisitatión.

**Mentamálanevndin 19. oktober 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum. Harumframt mælir ein minniluti, Halla Samuelsen og Helena Dam á Neystabø, til at verkætlanin eftirfylgjandi verður bjóðað út alment.

Málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 28. oktober 2020:** Samtykt at taka undir við minnilutanum í mentamálanevndini.

**Ískoyti**
Golfverkætlanin er nú komin hartil, at myndugleikaviðgerðin í mun til endaligt byggiloyvi er í gongd, og tilfarið at bjóða arbeiðið út er í gerð. Eisini hevur kommunan nú goldið øll endurgjøld sambært sáttmálanum millum kommununa, Búnaðarstovuna og festaran um lendið.

Samráðst er við Edwin Roald, golfvallararkitekt, um ráðgevarasáttmála í sambandi við byggingina av golfvølli við 9 holum, sum er fyrsta byggistig. Edwin Roald hevur staðið fyri verkætlanaruppskotunum, sum gjørd eru fyri kommununa í 2013 og 2017, og hevur saman við verkætlanarbólkinum, har Golffelagið er umboðað, arbeitt víðari við uppskotinum og nágreining av staklutum bæði viðvikjandi lendinum og installatiónum).

Uppskotið til byggistig I heldur seg innnanfyri verandi byggisamtykt á syðra partinum av Glyvursnesi og ger seg sostatt ikki inn á vegir, sum Tórshavnar havn hevur gjørt í sambandi við havnabygging.

Uppskotið um ráðgevarasáttmála fevnir um veitingar í sambandi við byggistig I, sum er totalráðgeving, herundir sniðgeving og projekt, útbjóðingartilfar og ráðgeving undir útinning v.m. Samlaður kostnaður á hetta ráðgevaraarbeiðið er áljóðandi kr. 1.180.000.

Verkætlanin hevur lagt seg eftir hugsjónum um, hvussu ein burðardyggur altjóða golfvøllur skal byggjast, hetta bæði við atliti

- at tálma byggikostnaðinum,
- at golfvøllurin er lættur av røkja og soleiðis tálma rakstrarútreiðslunum,
- at ítróttaliga upplivingin verður eftir altjóða standardi,
- at gera góðar og lættgongdar lendisgøtur, ið knýtir allan vøllin saman, og sum almenningur eisini fær gleði av,
- at dentur er lagdur á umhvørvið og náttúruna sum heild, og har serfyribrigdi kunnu verða bygd inn í sniðið sum varandi virði, og
- at talan er um strategiska kommunala íløgu í golfítróttina, fólkaheilsuna, ferðavinnuna, náttúrudepil v.m.

<u>Felagsumstøður</u>
Sum partur av endugjaldssáttmálanum yvirtekur kommunan eisini seyðahúsið á Glyvursnesi. Formliga er hetta 1. juli 2023. Golffelagið ynskir at gera húsið um til felagshús sum liður í at seta ferð á menningina av golfspælinum og golfumhvørvinum sum heild, meðan golfvøllurin verður bygdur.

Húsið kann við ávísum umbyggingum hýsa øllum hentleikum hjá felagnum, leikarum, vitjandi og ferðafólkum bæði til kapping, venjing og sosialt uppihald. Haraftrat ætlar felagið at seta upp golfsimulatorar til venjing og spæl.

Húsið sum tað er ella útbygt kann eisini hýsa atknýttar funktiónir til golfvøllin eitt nú viðvíkjandi garasju, goymslu, útgerð, tøknirúmi, tilfar v.m.

Neyv ætlan um umbygging og dagføring av húsinum fyriliggur ikki, heldur ikki kostnaðarmeting. Eitt tað fyrsta er at fáa at leggja el-leiðing til bygningin, talan er um uml. 350 metrar.

Mett verður skilagott, at gjørd verður avtala við Golffelagið um ætlanirnar viðvíkjandi felagshúsi v.m., harundir eisini stuðulsfígging.

<u>Útbjóðing</u>
Í 2018 varð mett, at golfvøllurin á Glyvursnesi við 9 holum fór at kosta umleið 28 mió. Eingin nýggjari kostnaðarmeting er gjørd, men við at bjóða arbeiðið út nú fæst tað staðfest. Við støði í hesum ber eisini til hjá býráðnum at leggja langtíðarætlan viðvíkjandi fíggingina av byggiarbeiðinum.
Ætlanin er at bjóða byggistig I út í høvuðsarbeiðstøku, har ið høvuðsarbeiðstakarin átekur sær at gera alt byggistig I, tó yvir eitt longri tíðarskeið (t.d 5 ár), soleiðis at tryggjað verður, at til ber at spæla golf á Glyvursnesi í byggitíðini. Nágreining og arbeiðslag verður avgreitt saman við vinnandi arbeiðstakaranum.

Verkætlanin kann sostatt verða játtað í stigum í mun til ávísa arbeiðið, sum skal gerast,
og arbeiðstakarin má leggja arbeiðið tilrættis eftir hesum treytum.

Arbeiðið fevnir í høvuðsheitum um gerð og uppbygnaður av 9 holum, hvar ið talan verður um avgrevstur av tilfari, boring og spreinging, javning av botni og uppfylling og planering fyri golfvølli, kloakk- og drenskipan, regnvatnsarbeiði og vatn-, el- og ljósarbeiði, v.m.

Umsitingin hevur ætlanir at bjóða føroyskan ráðgeva at standa fyri byggileiðslu og eftirlit á verkætlanini. Hetta verður í gjørt í samráð við golfvallararkitektin og umsitingina. Tá ið umsitingin hevur fingið tilboð á hetta arbeiðið, verður hetta lagt fyri nevnd aftur.

Tøk játtan til golfvøllin konta 5775 Ítróttaranegg L57016/LK57016 Golfvøllur á Glyrvursnesi er kr. 1.024.833. Harumframt eru í løgujáttan fyri 2023 kr. 2,5 mió aftrat. Samlað sostatt kr. 3.524.833.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjóri, mentamálaleiðarin og leiðarin á bygningsdeildini mæla til at:

- samtykkja uppskotið til ráðgevarasáttmála og gera sáttmála við Edwin Roald, 1
- geva umsitingini heimild at bjóða út byggistig I eftir leisti, sum lýst omanfyri,
- í hesum sambandi at játta kr. 1.578.000 av løgukarmi 57016 og kr. 2,5 mió av løgujáttan í fíggjarætlanini fyri 2023 til løgukontu L57016 Golfvøllur á Glyvursnesi, og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 30. november 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at kanna møguleikar fyri uttanhýsisfígging.

**Fíggjarnevndin 07. desember 2022:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 15. desember 2022:** Elsa Berg legði fram soljóðandi broytingaruppskot:

Mælt verður til at taka undir við fíggjarnevndini við teirri broyting, at kommunan eisini langtíðarleigar øki við somu støðd at skipa sum náttúfufríøki.

Atkvøtt varð um broytingaruppskotið, ið fall við fimm atkvøðum fyri, átta atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Jákup Dam, Gunvør Balle, Annika Olsen og Súsanna Olsen.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, og Kristian Martin Skála.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Lisitatión var 03.04.24. Dómsnevndin hevur viðgjørt tilboðini til golfvøllin. Niðurstøðan er, at Sp/f Grettir hevur vunnið lisitatiónina, sí dømingar skjal nr. 1 og lisitatiónsúrslitið á skjal 2

**62.443.484,00 u/mvg**

Teknisk fyrisiting ynskir at fáa heimild til at fara undir samráðing um arbeiðstøku- og gjaldsætlanar sáttmála við Sp/f Grettir

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin mælir til, at mentamálanevndin tekur undir við, at teknisk fyrisiting fer undir samráðingar um arbeiðstøku- og gjaldsætlanar sáttmála til at leggja aftur fyri nevnd.

**Mentamálanevndin 10. apríl 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Støðutakan um arbeiðstøkusáttmála og gjalds- og tíðarætlan um bygging av golfvøllinum er klár at leggja fyri nevnd og býráð. Arbeiðstakarin stendur við tilboðnum til 1. februar 2025.

Umframt at fáa gongd á byggingina av sjálvum vøllinum, ynskir felagið at fáa hóskandi felagsumstøður í Seyðahúsinum. Hetta fevnir bæði um umvælingar og smærri broytingar. Partur av hesum er eisini at fáa høli og golfsimulator til venjingar. Hetta ger, at til ber hava ein virknan felagsskap í økinum, meðan byggingin av vøllinum fer fram.

Tøk játtan á løgukontu 5775 57016 Golfvøllur á Glyvursnesi er uml. kr. 1,8 mió. Skotið verður upp at játta kr. 1,5 mió til felagsumstøðurnar hjá golffelagnum.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta kr. 1,5 mió av 5775 57016 Golfvøllur á Glyvursnesi til felagsumstøðurnar hjá golffelagnum til kontu 5370 stuðul til íløgur, og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina sum eykajáttan, ið tørvar tvær viðgerðir.

**Mentamálanevndin 30. oktober 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 06. november 2024:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið sum eykajáttanarmál, ið tørvar tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 28. november 2024:** Einmælt samtykt við fyrstu viðgerð.

Málið beint víðari til aðru viðgerð.

# 286/24 Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Hest

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.11.2021 | 202/21 | 21/04429-1 |
| 2 Hest/Koltursnevndin | 24.11.2021 | 5/21 | 21/04429-1 |
| 3 Býráðsfundur | 25.11.2021 | 304/21 | 21/04429-1 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 12.02.2024 | 47/24 | 21/04429-1 |
| 5 Hest/Koltursnevndin | 03.04.2024 | 2/24 | 21/04429-1 |
| 6 Býráðsfundur | 28.11.2024 | 286/24 | 21/04429-1 |

**Upprunin til málið**
Í málinum *Endurskoðan av byggisamtyktunum fyri bygdirnar* er samtykt, at endurskoða byggisamtyktirnar fyri allar bygdirnar í kommununi.

Fyri fleiri av bygdunum eru byggisamtyktirnar ikki vorðnar endurskoðaðar síðani tær eru blivnar partur av Tórshavnar kommunu, og tí er í nógvum førum ósamsvar millum byggisamtyktirnar fyri bygdirnar og almennu byggisamtyktina fyri Tórshavnar kommunu. Harumframt er munur á hvat loyvt verður í teimum ymisku bygdunum, og hetta ger byggisamtyktirnar fyri bygdirnar torskildar, truplar at umsita og viðførir ójavnvág í kommununi.

Í málinum *Endurskoðan av byggisamtyktunum fyri bygdirnar* eru yvirskipaði viðurskifti viðgjørd við tí endamáli, at fáa eins ásetingar í byggisamtyktunum fyri bygdirnar, tó við nøkrum frávikum, tá talan er um staðbundin viðurskifti og serstakan bygdadám.

Í hesum málinum verður serstaka byggisamtyktin fyri Hest viðgjørd nærri, við støði í yvirskipaðu viðurskiftunum, sum eru viðgjørd í málinum *Endurskoðan av byggisamtyktunum fyri bygdirnar.*

**Lýsing av málinum**
Hestur fekk sína fyrstu serstøku byggisamtykt í 2019. Í uppskotinum til endurskoðan av byggisamtyktini fyri bygdirnar verður mælt til, at bygdirnar Kirkjubøur, Velbastaður, Nólsoy, Hvítanes, Kaldbak og Hestur fáa hvør sína serstaka byggisamtykt, í trá við ásetingarnar fyri 4. grundumráði í Almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

Mett verður ikki, at serstøku byggisamtyktirnar fyri bygdirnar skulu hava eins nógv ymisk øki, sum almenna byggisamtyktin hevur, av tí at talan er um minni bygdir, har ikki ber til at regulera virksemið eins neyvt og í høvuðsstaðnum. Tí eru tær ymisku ásetingarnar fyri allar bygdirnar samanbornar, og funnið er fram til nakrar felags ásetingar, ið hóska til allar bygdirnar.

Áðrenn endurskoðanina av byggisamtyktini fyri Hest, eru hesi ymisku økini í bygdini:

A: Sethús
B: Havnaøki
D: Almennir stovnar og mentan
E: Neyst og bátapláss
F: Frítíðar- og summarhús
4. grundumráði

Niðanfyri eru ásetingarnar í uppskotinum til endurskoðan av byggisamtyktini fyri Hest, sum smb. uppskotinum eru tær somu fyri allar bygdirnar:

SA: Bústaðarøki
SB1: Havnaøki
SB2: Vinnuøki
SD1: Frílendi
SD2: Almennir stovnar og mentan
SE: Neyst
SF: Frítíðarhús
SG: Bóndahús

Tá kemur til bókstavir og tøl, verða somu tekin brúkt fyri økini í bygdunum sum í høvuðsstaðnum, men við tí muni, at "S" er sett frammanfyri bókstavirnar og tølini, t.d. "S"B1, fyri at vísa til at talan er um øki í eini serstakari byggisamtykt, og ikki í høvuðsstaðnum.

Sum sæst, so eru tað fleiri øki í uppskotinum til endurskoðan av byggisamtyktini fyri Hest, enn tað eru áðrenn endurskoðanina.

Umframt tey økini, sum vóru áðrenn endurskoðanina, so eru SB2 – Vinnuøki, SD1 – Frílendi og SG – Bóndahús. 4. grundumráði (Landbúnaður) verður tikið úr serstøku byggisamtyktini fyri Hest og lagt undir 4. grundumráði (Landbúnaður) í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

Tær ávísu broytingarnar í økjum og ásetingum eru nærri lýstar í skjalinum *Hestur – áðrenn og eftir broyting,* og ein meira yvirskipað lýsing er niðanfyri.

**Bústaðarøki**
Bústaðarøkini í Almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu loyva typologiunum stakhús, tvíhús, raðhús og íbúðir. Í bygdunum er ein meting gjørd av, hvør typologi skal loyvast í hvørjari bygd, gjørd út frá m.a. verandi bygging/ásetingum og bygdadámi.

Í Hesti verður mett ráðiligt at loyva stakhúsum og tvíhúsum. Hestur er ein minni bygd og mett verður ikki, at íbúðarbygging og raðhúsabygging hóskar seg til dámin í bygdini.

Í sethúsaøkjum í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu er minsta grundstykkjavídd 500 $m^2$. Í bygdunum verður yvirskipað mett, at grundstykkini kunnu vera minni, og í Hesti verður mett, at ein hóskandi minsta grundstykkjavídd er 300 $m^2$. Hetta m.a. grundað á verandi ásetingar fyri grundstykkjavídd í Hesti og verandi víddir á grundstykkjum í Hesti.

Ásetingar viðv. hædd, byggi- og nýtslustig vera tær somu sum sum fyri sethúsaøki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

**Almenn øki**
Umframt øki til almennar stovnar og mentan, verður tað í bygdunum mett vera skilagott við einum øki til frílendi, har ikki ber til at ikki er loyvt at byggja.

**Neystaøki og øki til frítíðarhús**
Ynski hevur leingi verið um at loyva frítíðarbústøðum í neystum, og mett verður, at ásetingarnar fyri neystaøkini í bygdunum skulu vera soleiðis, at til ber at hava frítíðarbústað á loftinum. Tó, so skulu nakrar treytir verða, t.d. skulu kloakkir og aðrar leiðingar gjaldast av neystaeigarunum og á niðastu hædd skal vera møguligt at hava bát.

Í bygdunum eiga somuleiðis at vera løgd av øki til frítíðarhús. Hesi eiga at liggja í útjaðaranum av bygdini, soleiðis at nærleiki er til almennar hentleikar, uttan at tey gera seg ov nógv inn á bygdalagið – í hesum sambandi eiga atlit so sum stødd á øki, bygging, snið og tílíkt at verða tikin. Á økjunum til frítíðarhús eigur

ikki at vera møguligt at búgva alt árið, grundstykkini kunnu vera minni, og til ber at skipa tey annarleiðis enn vanlig bústaðarøki, við t.d. felags parkeringsplássum.

**Landbúnaðarøki**
Sambært almennu byggisamtyktini §26, stk. 5, liggja allar bygdirnar í kommununi í 4. grundumráði í Tórshavnar kommunu, og hava tær serstakar byggisamtyktir, ið stýra byggingini. Tí verður 4. grundumráði og onnur landbúnaðarøki tikið úr serstøku byggisamtyktunum fyri bygdirnar.

Í nøkrum av bygdunum var áðrenn endurskoðanin ein serskild áseting fyri øki til bóndahús. Hendan gav festarunum størri frælsi til at umvæla sethús síni, enn ásetingarnar fyri 4. grundumráði geva. Tí ynskir man, at eitt øki SG: Bóndahús til bóndahús verður í byggisamtyktunum fyri bygdirnar.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Í § 26, stk. 5 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu er ásett at:

- *Í bygdunum Kaldbak, Kaldbaksbotni, Hvítanesi, Norðradali, Syðradali, Nólsoy, Hestur, Koltur, Kirkjubø og Velbastað kann, út um tað, ið er ásett fyri 4. grundumráði, einans verða bygd sambært serstakum byggisamtyktum.*

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

- *Endurskoðan av byggisamtyktunum fyri bygdirnar,* journal nr. 20/04243.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

- *Hestur – áðrenn endurskoðan*, journal nr. 21/04429-2.
- *Hestur – Eftir broyting*, journal nr. 21/04429-2.
- *Serstøk byggisamtykt – Hestu*r, journal nr. 21/04429-3.
- *Hestur – áðrenn og eftir broyting,* journal nr. 21/04429-4.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/léttar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at samtykkja uppskotið til endurskoðan av byggisamtyktini fyri Hest smb. skjølunum *Serstøk byggisamtykt – Hestur* og *Hestur - Eftir broyting*, og beina málið í býráðið umvegis staðbundnu nevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. november 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Hest/Koltursnevndin 24. november 2021:** Kunnað varð um málið.

**Býráðsfundur 25. november 2021:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í sambandi við at uppskotið til endurskoðan av byggisamtyktini fyri Hest, eftir leistinum, ið er samtyktur omanfyri, varð sent Umhvørvismálaráðnum til góðkenningar, hevur Umhvørvismálaráðið vent aftur til Tórshavnar kommunu við viðmerking til leistin. Umhvørvismálaráðið metir tað ikki vera rætt, at bygdirnar verða reguleraðar við serstøkum byggisamtyktum, men tær áttu heldur at verið reguleraðar í almennu byggisamtyktini, ella við hvør sínari almennari byggisamtykt.

Umsitingin hjá Tórshavnar kommunu tekur undir við hesum og metir tað vera rættast, at regulera bygdirnar við hvør sínari almennari byggisamtykt, heldur enn at regulera tær við almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu. Hetta tí at mett verður, at atlit skulu takast at ymiskum staðbundnum viðurskiftum og bygdadámi, so sum typologium og grundstykkjavídd. Harumframt verður tað ikki mett, at byggisamtyktirnar fyri bygdirnar skulu hava líka nógv ymisk øki, sum almenna byggisamtyktin fyri Tórshavnar kommunu, av tí at talan er um minni øki, har tað ikki er skynsamt at regulera virksemið eins neyvt, og í høvuðsstaðnum.

At byggisamtyktirnar fyri bygdirnar gerast almennar ístaðinfyri serstakar, merkir, at byggisamtyktirnar fyri bygdirnar somuleiðis fáa ásetingar fyri viðurskifti so sum umsiting, óbygdu økini og vegir. Hesar ásetingar verða tær somu, sum í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

Tá byggisamtyktirnar fyri bygdirnar vórðu reguleraðar við serstøkum byggisamtyktum, kom økið, ið ikki hevði sína egnu áseting í serstøku byggisamtyktini, undir 4. grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu. Av tí at byggisamtyktirnar fyri bygdirnar nú gerast almennar, verða ásetingar fyri landbúnaðarøki í byggisamtyktunum fyri bygdina, og verða hesar tær somu, sum fyri 4. grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

Síðani leisturin fyri byggisamtyktirnar fyri bygdirnar varð lagdur, hevur tað verið umrøtt, um tað hevði verið rættast, at havt eina áseting fyri miðstaðabygging í bygdunum. Í fyrsta umfari varð mett at hetta kundi leggjast saman við bústaðarøkjum, men tað er ikki alt miðstaðarvirksemi, ið hóskar seg at liggja í bústaðarøkjum, t.d. stórir ella miðal stórir mentanarstovnar, samkomuhús og bygging til ferðavinnu. Tískil verður mælt til at gera eina serskilda økisáseting til miðstaðabygging, øki C, ið skal rúma tílíkum virksemi í bygdunum. Serloyvi kann framvegis gevast til smærri handlar, vinnuvirki og stovnar í bústaðarøkjum, um hetta natúrliga hoyrir býlinginum til.

Til ber at síggja endurskoðaðu almennu byggismtyktina fyri Hest í skjalinum *Almenna byggisamtyktin – Hestur.*

**Skjøl**
- *Almenna byggisamtyktin – Hestur,* journal nr. 21/04429-14.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla nevndini til at umrøða broytta leistin, har:
- Byggisamtyktirnar fyri bygdirnar verða almennar, ístaðinfyri serstakar.
- Landbúnaðarøki 4. grundumráði, við somu ásetingum sum 4. grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, verður lagt afturat ásetingunum í almennu byggisamtyktunum fyri bygdirnar.
  Øki C, miðstaðabygging, verður lagt afturat ásetingunum í almennu byggisamtyktunum fyri bygdirnar.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 12. februar 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Hest/Koltursnevndin 03. apríl 2024:** Kunnað varð um málið.

**Býráðsfundur 28. november 2024:** Einmælt samtykt.

# 287/24 Dátuvernd og KT-trygd í Tórshavnar kommunu 2024

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 17.04.2024 | 100/24 | 24/00965-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 22.05.2024 | 137/24 | 24/00965-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 09.10.2024 | 254/24 | 24/00965-1 |
| 4 Býráðsfundur | 24.10.2024 | 260/24 | 24/00965-1 |
| 5 Býráðsfundur | 28.11.2024 | 287/24 | 24/00965-1 |

**Upprunin til málið**
**Innleiðing - skipanir í gjár, í dag og framtíðin**
Tá TK í 2018 av álvara byrjaði at geva dátuverju og kt-trygdini ans sá landslagið øðrvísi út. Tað var friðarheimur, og veitarar bjóðaðu skipanir, sum vóru keyptar ella leigaðar inn umvegis licens, og dátur vórðu fyri tað mesta hýstar innanhýsis.

Seinastu árini hevur landslagið skift skap við rúkandi fer. Kríggj er eysturi í Europa og Miðeystri, sum skapar neiligar ristingar og ringvirkningar, sum eisini raka okkara landaøkir. Hin síðan er økta menningin innan kunningartøkni, sum skapar rúm fyri talgildum tænastum á flest øllum økjum. Hýsing av dátum og tænastuveitingum verður í nógv størri mun flutt út til veitaran ella undirveitarar, eins og vitlíki stendur fyri durunum.

Tað er umráðandi, at trygdarfyriskipanir til dátuvernd og kt-trygd fylgja ásetingum í lógum og reglugerðum innan økið, umframt at tillaga seg talgildu og tøkniligu menningini og menningin í hóttanarmyndini, sum vendir sær móti samfelagnum generelt og almennum myndugleikum í Føroyum.

**Lýsing av málinum**
**Nýggi veruleikin setur hægri og strangari krøv**
Vit liva í eini skiftistíð. Samstundis, sum vavið av dátum á netinum veksur og undirstøðukervið gerst meira talgilt, økist talið av netálopum og hóttanum.

Veruleikin skapar eina nýggja og ótrygga støðu, og setur størri og strangari krøv til dátuverjuna og kt-trygdina. Tí er umráðandi at taka hendingar í umheiminum við í líkningina, og hyggja út um landoddarnar, hvat grannalond gera fyri at økja um trygdina og forða álopum.

Í 2018 kom GDPR lóggávan í gildi í ES, og stutt eftir hetta, í 2021, kom nýggja dátuverndarlóggávan í gildi í Føroyum.

Nýggjari krøv eru til dømis NIS2, sum er ES fyriskipan (direktiv) fyri nettrygd. NIS2 er ætlað sum eitt løgfrøðiligt amboð, ið skal skapa eina trygdarmentan og tryggja harmoniserað og felags høgt nettrygdarstøði í ES. NIS2 er serliga galdandi fyri sektorar í samfelagnum av alstórum týdningi, sum varða av kritiskum undirstøðukervi fyri eitt nú el- og vatnveiting, sjúkrahúsverk, tele- og fíggjargeiran. Fyri kortum varð fyriskipan fyri vitlíki viðtikið í ES. Lógarverkini og reguleringarnar hava til endamáls at verja tjóðir og borgarar og stuðla uppundir, at dátuvernd og kt-trygd verður umsitið við skili.

Løgtingið hevur fyri kortum umrøtt at seta í verk eina byrjan til nettrygdarlóggávu í Føroyum, við tillaging í fjarskiftislóggávuni, sum gevur fjarskiftiseftirlitinum víðkaðar heimildir eitt nú til portskanning (Scanning av ferðslu inn og út á netinum í Føroyum). Ætlanin er, at føroyska nettrygdarlóggávan leggur seg tætt upp at krøvunum í NIS2.

Í Danmark skulu almennir myndugleikar fylgja ásettum tøkniligum minimumskrøvum. Hesi eru grundaði á tjóðarstrategi´ini (National strategi) fyri net- og kt-trygd 2022-24. Tjóðarstrategi´in verður løgd av Digitaliseringsstyrelsen í tøttum samstarvi við Center for Cybersikkerhed (CFCS), Statens it, og PET.

**Status – hvar eru vit?**
*Arbeiðið við dátuvernd og kt-trygd*

TK tekur dátuvernd og kt-trygd í álvara. Borgarar og starvsfólk skulu vera á so upplýstum støði sum gjørligt og kenna seg trygg og kunna hava álit á dátuverjuni hjá TK.

Seinastu árini hevur verið arbeitt miðvíst við at seta dátuvernd og kt-trygd í góðar og skipaðar karmar. TK hevur Governance/Compliance/Risk (GCR) skipanina Wired Relations (WR). Skipanin tryggjar miðsavnan og stýring av dátuvernd, skjalfesting av trygdarbrotum, váðagreining, policy-management vm. Leiðslan hevur avgjørt, at dátuverndar- og kt-trygdarstøði skal fylgja ásetingum í ISO 27002 og 27701. Eisini hetta arbeiði verður gjørt í WR.

Fleiri enn 1.000 síður av lógarkravdari skjalfesting er gjørd. Skjalfestingin fevnur millum annað um politikkir, mannagongdir, greiningar, frágreiðingar, kunningar, frálæru, skrásetingar, yvirlit og dátuviðgeraravtalur.

Við støði í skjalfestingini eru hópurin av praktiskum átøkum gjørd fyri at tryggja hægri dátuvernd og kt-trygd og fyribyrgja trygdarbrotum (mitigerandi arbeiði). Nevnast kann undirvísing av starvsfólkum, uppseting av tryggum telduposti, secure-print, uppstigan av firewall og gera hann meira lokalan, sundurskiljing av netinum, uppstigan av servarum, gamlar skipanir eru avviklaðar ella skiftar, miðsavning av keyp ella menning av skipanum, eftirkanning av loggum, eftirlit og trygdarkrøv til veitarar, brongling av harddiskum vm.

*Dátueftirlitið*

Sum eitt tað største arbeiðspléssi í landinum og við dátum frá nærum øllum lívsrenslinum hjá borgaranum, heldur DAT vakið eyga við TK. TK hevur seinastu árini verið undir støðugum eftirlitið og hevur latið størri og minni frágreiðingar til DAT.

DAT ger umframt árlig eftirlit á fleiri økjum í TK. Eftirlitini er bæði yvirskipað og fevna breitt, men eisini niður í dýpdina á serøkjum, eitt nú sosiala økið og eldraøkið.

Seinasta eftirlit á eldraøkinum fevnur um eftirlit á staðnum fyri at staðfesta um einstaka starvsfólki er tilvitað um dátuvernd og kt-trygd, og fylgir skjalfestu mannagongdum og leiðreglum í praksis. Eftirlitini flyta seg frá at vera dátuvernd á pappírinum til dátuvernd í praksis.

Krøvini frá DAT seta krøv til TK um, at dátuverndin skal náa út til einstaka økið og skal vera á hóskandi støði tøkniliga og bygnaðarliga. Leiðsla og starvsfólk á stovnum fáa frálæru um, hvussu hesi skulu skipa seg fyri, at dátuvernd verður integrerað í dagliga arbeiðinum í tráð við ábyrgdarmeginregluna, ið er ásett í dátuverndarlógini.

Greiningar vísa, at flestu trygdarbrot henda av menniskjaligum áum. TK skal tí miðvíst og áhaldandi arbeiða við frálæru fyri at skapa eina dátuverndarmentan og -hugburð í kommununi.

**Hvar vilja vit?**
Við støði í omanfyri nevnda arbeiði við dátuvernd og kt-trygd, er váðagreining gjørd fyri partar av kt-økinum. Váðagreining vísir eitt váðastig sum liggur á miðal. Ynskiligt er, at váðastigið kemur niður á lágt ella týdningarleyst. Fyri at náa hesum málið, skulu fleiri størri og neyðug átøk setast í verk.

Sum víst verður á í leiðslufrágreiðingini ber ikki at tosa um dátuvernd og kt-trygd uttan nøktandi váðagreiningar. Somuleiðis vísir DVL á, at alt arbeiði við dátuvernd og kt-trygd skal vera grundað á

váðagreining. Váðagreiningar avdúka blindar vinklar og glopp, og harvið veikleikar og manglar, innan dátuvernd og kt-trygd.

Við støði í DVL skulu váðagreiningar gerast av bygnaðarligum og tøkniligum fyriskipanum. Hetta merkir, at váðagreiningar skulu gerast yvirskipað og niður á skipanar støði.

Váðagreiningar á skipanarstøði er serliga neyðug tá hugsað verður um, at fleiri skipanir við tíðini fara í cloud (skulu hýsast uttanhýsis). Váðagreining skal gerast av øllum skipanum við persóndátu og trúnaðardátum fyri at kenna trygdarstøði, møguligar veikleikar og fyri at eyðmerkja kritiskar skipanir.

Samstundis sum váðagreiningar verða settar í verk, eigur miðvíst at vera farið undir at fylgja ásetingum í ISO 27002/27701. Ásetingarnar í ISO standardinum taka atlit til, at TK á ein skipaðan hátt, fær skjalfest neyðug dátuverndar- og kt-trygdarátøk umframt, at ein slík fyriskipan lyftir TK upp á eitt viðurkent trygdarstøði.

Onnur átøk, ið eru neyðug fyri at tryggja, at TK fylgir ásetingunum í DVL kunnu síggjast í tilmælunum í leiðslufrágreiðingini frá DPO fyri 2023.

Vavið er umfatandi, og tíverri eru ongir skjótt syftir seiðir innan dátuvernd og kt-trygd. Økið krevur bæði serkøna vitan og væl av tilfeingi. TK hevur í dag avmarkað tilfeingi til viðlíkahald av verandi og áhaldandi uppgávum og verkætlanum.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Kunnað verður um málið.

**Fíggjarnevndin 17. apríl 2024:** Útsett.

**Fíggjarnevndin 22. mai 2024:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Til fíggjarnevndarfundin 13. apríl 2024 varð kunnað um støðuna á dátuverndar og kt-trygdarøkinum.

Víst var á, hvussu landslagið hevur skift skap við rúkandi ferð. Nógvur ófriður er í heiminum, og vegna øktu talgildingina skapar hetta neiligar ristingar og ringvirkningar, sum eisini raka okkara landaøkir.

Í talgildum høpi er heimurin tódnaður, og Føroyar liggja eins nær, sum onnur lond, tá tað snýr seg um hjá fíggindasinnaðum teldusníkum at røkka og sleppa framat okkara skipanum og dátum og gera skaða, fyri síðani at krevja loysigjald, sum aftur fíggjar meira fíggindaligt virksemi. Seinastu dømini eru størri trygdarbrot hjá fyritøkum og almennum stovnum í Føroyum.

Tað er í dag enn meira umráðandi, at trygdarfyriskipanir til dátuvernd og kt-trygd fylgja ásetingum í lógum og reglugerðum innan økið.

Sum víst var á í málinum fyrr í ár, er nógv hent fyri at skapa hóskandi, verjandi karmar um dátuvernd og kt-trygd í TK. TK hevur seinnu árini arbeitt á nógvum frontum við dátuvernd og kt-trygd.
Vavið er umfatandi, økið krevur bæði serkøna vitan og væl av tilfeingi, bæði til viðlíkahald av verandi átøkum, men eisini til nýggjar uppgávur og verkætlanir fyri at tryggja regluvarni (compliance) við lóggávur og reglugerðir, og ikki minst fyri at skapa ta neyðugu trygdina fyri borgaran og TK.

Serlig økir, sum eiga at vera raðfest, sum víst hevur verið á í undanfarnari kunning og, sum síggjast í tilmælunum í leiðslufrágreiðingini frá DPO fyri 2023, eru lýst niðanfyri:

**Offline Back-up**
TK skal tryggja sær at hava eitt burðardygt offline back-up. Back-up kunnu stigbendast og skapast í ymiskum tíðarintervallum. TK hevur í dag back-up fyri 7 hvønn dag tvs. tilber at fara 7 dagar aftur í tíðina. Eru teldusníkar komnir inn áðrenn 7. dagin ber ikki til at tryggja dátur longri aftur í tíðini. Fyri at tryggja verandi back-up skal TK hava eitt offline back-up, sum røkkur longri aftur, td. 6 mðr.
Back-up er ein liður í at tryggja, at mistar dátur kunnu endurskapast. Endamálið við at økja um offline back-up virksemið er at tryggja fysiskan skilnaða soleiðis, at ongin sleppur framat dátunum um netið verður álopið.

**Ekstern váðagreining og eftirgjørd trygdarbrot**
Við støði í dátuverndarlógini um viðgerðartrygd, verður krav sett til TK, um at dátuábyrgdarin skal hava hóskandi tøkniligar og bygnaðarligar fyriskipanir at verja dátur í TK. Alt dátuverndar og kt-trygdarvirksemið hjá TK skal gerast við støði í váðagreining. Váðagreiningar avdúka blindar vinklar og glopp, og harvið veikleikar og manglar, innan dátuvernd og kt-trygd. TK eigur at fáa serkøna og óhefta uttanhýsis váðagreining gjørda av dátuverndar og kt-trygdarfyriskipanum hjá TK, sum kann lýsa veruliga dátuverndar og kt-trygdarstøðið hjá TK. Trygdarbrot verða eftirgjørd við
fysiskum álopum á TK av ymiskum slag, í mun til tað fyribyrgjandi virksemið TK hevur sett upp.

**Striking av dátum**
Ein av meginreglunum í dátuverndarlógini er striking av dátum, ein av grundgevingunum er, at dátur, sum ikki eru til ikki kunnu missast, skeiklast ella misnýtast. TK hevur fleiri enn 150 kt-skipanir har støða skal takast til striking av dátum. Dátueftirlitið hevur eitt vakið eyga við í hvønn mun TK hevur tikið støðu til

striking og/ella varðveitslu av dátum. Fyri at náa á mál er talan er um eina størri verkætlan, sum krevur at fólk situr burturav við verkætlanini.

**Økja tilfeingið til dátuvernd og kt-trygd**
Sum áður nevnt er vavið á dátuverndar og kt-trygdarøkinum umfatandi. Hetta skal síggjast í ljósinum av tí ferð talgildingin sum heild mennist við, men eisini við tí proportionellum økingini av yrkisligum brotsliðum og teldusníkum, sum liggja framvið og vilja sleppa framat dátunum.

Fyri at koma á mál við omanfyri nevndu raðfestingum og fáa framskundað íverksetan av fyribyrgjandi trygdartiltøkum, er neyðugt at økja um íløguna í tilfeingi til dátuvernd og kt-trygd.

Fyri at røkka hesum málið er neyðugt at økja tilfeingið við einum ársverki til felags uppgávur innan Dátuverndar- og kt-trygdarøkið, umframt at upphædd verður sett av til váðagreining, eftirgjørd trygdarbrot og verkætlanarstarv til striking av dátum.

Mælt verður til, at seta partar av upphæddini av í ár, so gongd kann fáast á virksemið skjótast tilber, og, at partur av virkseminum kann setast á fíggjarætlan fyri 2025.

**Tilmæli:**
Fyrisitingarstjórin, KT-leiðarin og váðaráðgevin mæla fíggjarnevndini til at játta 800 t.kr. til offline back-up, uttanhýsis váðagreining og eftirgjørt trygdarbrot fíggja av konti 20910 aðrar útreiðslur.

Eisini verður mælt til at fáa sett av pening til verkætlanarstarv til striking av dátum, umframt at fáa pening sett av til eitt dátuverndar- og kt-trygdarstarv á fíggjarætlanin 2025.

**Fíggjarnevndin 09. oktober 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 24. oktober 2024:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 28. november 2024:** Einmælt samtykt.

| | Býráðsfundur<br>28. november 2024 | Blað nr.: 1186<br><br>Formansins merki: |
|---|---|---|

## 288/24 Fíggjarætlan 2025, Tórshavnar kommuna

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 19.09.2024 | 230/24 | 24/07504-1 |
| 2 Býráðsfundur | 19.09.2024 | 237/24 | 24/07504-1 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.10.2024 | 156/24 | 24/07504-1 |
| 4 Tekniska nevnd | 07.10.2024 | 58/24 | 24/07504-1 |
| 5 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 08.10.2024 | 38/24 | 24/07504-1 |
| 6 Havnanevndin | 10.10.2024 | 31/24 | 24/07504-1 |
| 7 Heilsu- og eldranevndin | 08.10.2024 | 21/24 | 24/07504-1 |
| 8 Mentamálanevndin | 02.10.2024 | 169/24 | 24/07504-1 |
| 9 Trivnaðarnevndin | 03.10.2024 | 34/24 | 24/07504-1 |
| 10 Vinnunevndin | 03.10.2024 | 23/24 | 24/07504-1 |
| 11 Fíggjarnevndin | 23.10.2024 | 257/24 | 24/07504-1 |
| 12 Býráðsfundur | 24.10.2024 | 262/24 | 24/07504-1 |
| 13 Fíggjarnevndin | 27.11.2024 | 280/24 | 24/07504-1 |
| 14 Býráðsfundur | 28.11.2024 | 288/24 | 24/07504-1 |

**Upprunin til málið**
Fíggjarnevndin skal sambært kommunustýrislógini leggja uppskot til fíggjarætlan fyri býráðið í seinasta lagi 1. oktober.

Býráðið skal síðani viðgera uppskotið tvær ferðir við í minsta lagi 14 daga millumbili. Fíggjarætlanin skal vera endaliga samtykt í seinasta lagi 1. desember.

Býráðið hevur fyrstu viðgerð 24. oktober og aðru viðger 21. november.

**Lýsing av málinum**
Í uppskotinum til fíggjarætlan 2025 er roknað við, at kommunuskattaprosentið og barnafrádrátturin framhaldandi verða ávikavist 19,00% og 9.000 kr.

Fortreytirnar í uppskotinum eru, at rakstrarútreiðslur kunnu bert hækka, um talan er um:

- lógarkrøv
- býráðssamtyktir íroknað virksemisbroytingar, sum fylgja av nýggjum íløgum
- sáttmálabroytingar og líknandi.

Í talvuni niðanfyri síggjast høvuðstølini býtt á kommunugreinar.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>28. november 2024 | Blað nr.: 1187<br>Formansins merki: |

| 1.000 kr. | | Roknskapur 2023 | Ætlan 2023 | Ætlan 2024 | Ætlan 2025 | Broyting 2024/2025 pct. | kr. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | | | | | | |
| **Inntøkur** | | | | | | | |
| 20501 | Kommunuskattur | 1.002.375 | 951.000 | 1.011.886 | 1.095.359 | 8,25% | 83.473 |
| 20601 | Felagsskattur | 61.838 | 60.000 | 58.000 | 58.000 | 0,00% | 0 |
| 20502 | Húsaleiguskattur | 830 | 1.000 | 1.000 | 1.000 | 0,00% | 0 |
| 20801 | Skattur af eftirlønarinngjøldum | 199.714 | 191.862 | 209.753 | 228.443 | 8,91% | 18.690 |
| 20802 | DIS, FAS og frádráttir | 36.421 | 36.421 | 35.704 | 34.389 | -3,68% | -1.315 |
| 20804 | Kommunanna partur av Veiðigjaldi | 0 | 0 | 0 | 500 | 0,00% | 500 |
| 20805 | Kommunanna partur av Tøkugjaldi | 0 | 0 | 0 | 200 | 0,00% | 200 |
| | **Inntøkur íalt** | **1.301.178** | **1.240.283** | **1.316.343** | **1.417.891** | **7,71%** | **101.548** |
| | | | | | | | |
| **Rakstur** | | | | | | | |
| §1 | Kommunal fyrisiting | 95.640 | 100.179 | 100.713 | 105.718 | 4,97% | 5.005 |
| §2 | Almanna- og heilsumál | 315.928 | 313.190 | 321.960 | 350.808 | 8,96% | 28.848 |
| §3 | Børn og ung | 241.987 | 225.921 | 235.494 | 253.352 | 7,58% | 17.858 |
| §4 | Undirvísing | 50.285 | 51.617 | 56.538 | 58.754 | 3,92% | 2.216 |
| §5 | Mentan og frítíð | 94.724 | 64.636 | 70.350 | 78.997 | 12,29% | 8.647 |
| §6 | Teknisk mál | 157.361 | 152.110 | 156.688 | 167.049 | 6,61% | 10.361 |
| §7 | Kommunal virkir TK | 94.246 | 85.699 | 90.983 | 96.389 | 5,94% | 5.406 |
| | **Rakstur íalt uttan TH** | **1.050.169** | **993.353** | **1.032.726** | **1.111.068** | **7,59%** | **78.342** |
| §7 | Kommunal virkir TH | -38.083 | -40.070 | -36.939 | -36.985 | 0,12% | -46 |
| | **Rakstur íalt** | **1.012.086** | **953.283** | **995.787** | **1.074.083** | **7,86%** | **78.296** |
| | | | | | | | |
| **Aðrar útreiðslur** | | | | | | | |
| 20101 | Stuðul til rentuútreiðslur | 29.795 | 18.000 | 30.000 | 30.000 | 0,00% | 0 |
| 20910 | Aðrar inntøkur | 1.944 | 2.000 | 2.000 | 2.000 | -0,02% | 0 |
| | **Aðrar útreiðslur íalt** | **31.739** | **20.000** | **32.000** | **32.000** | **0,00%** | **0** |
| | | | | | | | |
| | **Úrslit áðrenn rentur** | **257.353** | **267.001** | **288.556** | **311.809** | **8,06%** | **23.253** |
| | | | | | | | |
| **Rentur** | | | | | | | |
| 20301 | Rentuútreiðslur TK | 8.564 | 651 | 13.217 | 10.962 | -17,06% | -2.255 |
| 20301 | Rentuútreiðslur TH | | 4.482 | 5.043 | 5.037 | -0,12% | -6 |
| 20401 | Rentuinntøkur TK | 2.003 | 0 | 0 | 0 | 0,00% | 0 |
| 20401 | Rentuinntøkur TH | | -500 | 0 | 0 | 0,00% | |
| | **Rentur íalt** | **6.561** | **5.633** | **18.260** | **15.999** | **-12,38%** | **-2.261** |
| | | | | | | | |
| | **Úrslit av rakstri TK/TH** | **250.791** | **261.368** | **270.296** | **295.810** | **9,44%** | **25.514** |
| | | | | | | | |
| | | | | | | | |
| | **Avdráttir TK** | **1.234** | **1.234** | **23.033** | **22.733** | -1,30% | -300 |
| | **Avdráttir TH** | **15.180** | **15.873** | **15.873** | **15.874** | 0,01% | 1 |
| | **Úrslit av rakstri TK/TH** | **234.377** | **244.261** | **231.390** | **257.203** | **11,16%** | **25.813** |
| | | | | | | | |
| | **Avlop til skattafíggjaðar íløgur hjá TK*** | **211.474** | **225.046** | **215.367** | **241.129** | **11,96%** | **25.762** |
| | | | | | | | |

## Búskaparliga gongdin og útlit

Tað hevur verið stór framgongd og framburður í føroyska samfelagnum hesi seinastu árini. Samlaða fólkatalið er vaksið úr 49.785 í 2017 upp í 54.464 í 2023. Hetta er svarar til ein samlaðan vøkstur í fólkatalinum á 4.679 svarandi til 9% í tíðarskeiðnum frá 2017 til 2023. Hetta sama tíðarskeiðið er fólkatalið í Tórshavnar Kommunu vaksið úr 20.850 upp í 23.214, svarandi til 2.364 fólk ella 11%.

Meira enn helvtin av samlaða fólkavøkstrinum í Føroyum hesi seinastu seks árini er sostatt lagdur afturat fólktalinum í Tórshavnar Kommunu. Um hugt verður nøkur ár fram í tíðina, so metir Hagstova Føroya, at samlaði vøksturin í føroyska fólkatalinum verður 1.380 fólk í árunum frá 2025 til 2032, og Tórshavnar Kommuna kemur at eiga nógv tann størsta partin av hesum vøkstrinum, svarandi til 979 fólk.

Fólkavøksturin merkir, at Tórshavnar Kommuna fær fleiri inntøkur í kommunukassan, men fólkavøksturin merkir eisini, at kommunan fær fleiri skyldur og útreiðslur til vælferðartænastur til borgaran og skattgjaldaran í kommununi. Kommunan er til fyri borgaran og skal veita skattgjaldaranum

vælferðartænastur av ymsum slag fyri skattakrónurnar, sum skattgjaldarin rindar í kommunukassan, og tað er fólkasamansetingin og aldursbýti, sum leggja grundarlagið undir, hvussu vælferðartænasturnar verða raðfestar.

Aldurssamansetingin í Tórshavnar Kommunu hevur verið rættiliga støðug tey seinastu árini, men nú kunnu broytingar staðfestast. Tilgongdin av børnum minkar og soleiðis fer gongdin, sambært Hagstovu Føroya, eisini at verða komandi árini. Fólkapyramidan í Tórshavnar Kommunu fer at vaksa í ovara endanum, meðan hon fer at minka í niðara endanum við børnum og ungum. Henda gongdin ávirkar politisku raðfestingarnar í kommununi.

Tað er framvegis stórur vøkstur í virkseminum í føroyska samfelagsbúskapinum, og tí hava hækkingarnar í sáttmálalønunum á privata og almenna arbeiðsmarknaðinum umframt lønarlyfti til ávísar lønarbólkar stóra ávirkan á fíggjarligu viðurskiftini hjá kommununi. Skattainntøkurnar í ár vera hægri enn upprunaliga mett, men rakstrarútreiðslurnar verða eisini hægri, bæði av stóra vøkstrinum í sáttmálalønunum og lønarlyftinum til ávísar lønarbólkar, sum kostar Tórshavnar Kommunu næstan 14 mó. kr. longu í ár. Lønarlyftið var ikki við í upprunaligu fíggjarætlanini fyri 2024, men verður játtað við eykajáttan.

Í nýggjastu frágreiðing sínari, sum varð almannakunngjørd 2. september í ár, metir Búskaparráðið um gongdina í føroysku bruttotjóðarúrtøkuni, BTÚ, í leypandi prísum í árunum frá 2021 til 2025. Árini 2021 og 2022 eru staðfest úr uppgerðini hjá Hagstovu Føroya, meðan árini frá 2023 til 2025 eru metingar hjá Búskaparaáðnum. Her verður staðfest, at vøksturin var størstur í 2022, tá ið hann var 9,5% í mun til 7,7% í 2021. Síðan metir Búskaparráðið, at árligi vøksturin í búskapinum fer at minka í árunum frá 2023 til 2025. Árligi vøksturin fer at minka úr 5,6% í 2023 til 3,3% í 2025.

Í frágreiðingini vísir Búskaparráðið á, at borgarar og heimliga handilsvinnan framvegis eru bjartskygd, meðan tilfeingisvinnurnar eru minni bjartskygdar um framtíðarútlitini. Inflatiónin er minni nú enn fyri tveimum árum síðan. Brúkaraprístalið hækkaði við 3,0% í øðrum ársfjórðingi í ár samanborið við somu tíð í fjør. Hóast arbeiðsloysið er hækkað eitt vet í seinastuni tíðina, so er tað framvegis sera lágt í altjóða samanhangi. Føroyska arbeiðsloysið var 1,1% í juli 2024.

Búskaparráðið vísir eisini á vandar og avbjóðingar fyri framhaldandi vøkstri í føroyska búskapinum í nýggjast frágreiðing sínari, og tríggjar tær størstu avbjóðingarnar eru framvegis tær somu, sum Búskaparráðið hevur havt ovast á breddanum tey seinastu árini.

Sambært Búskaparráðnum eru tríggjar tær størstu avbjóðingarnar fyri føroyska samfelagsbúskapin framvegis manglandi arbeiðsmegin, avmarkaðir bústaðarmøguleikar og manglandi avlop á almennu fíggjarætlanunum í búskaparligu góðu tíðunum, vit hava havt, hesi seinastu nógvu árini.

Tað skal viðmerkjast, at Tórshavnar Kommuna leggur stóra orku í at skipa nýggju bústaðarútstykkingarnar í kommununi soleiðis, at tær ikki bert vera til sethús, men eisini eitt breitt úrval av øðrum bústaðareindum og leigubústøðum av ymsum slag og stødd.

Hóast ferðin á vøkstrinum í fólkatalinum verður mett at fara at minka komandi árini, so er tørvurin á einum breiðum og fjølbroyttum úrvali av bústøðum framvegis stórur.

Føroyski bústaðarmarknaðurin verður spakuliga meira fjølbroyttur, men føroyski bústaðarmarknaðurin er framvegis einstáttaður. Av øllum búeindum í Føroyum eru 93% sethús og 5% íbúðir. Í Tórshavnar Kommunu eru 86% sethús og 10%íbúðir. Til samanberingar eru 37% av øllum búeindum í Danmark íbúðir, meðan 39% eru sethús.

Politiska skipanin í Tórshavnar Kommunu hevur roynt og roynir alsamt at taka ímóti fólkavøkstrinum í kommuni við skilagóðum og skynsomum raðfestingum í vælferðina og trivnaðin í kommununi.

Av nýggju og stóru íløgunum til ymsu vælferðarøkini í kommununi kunnu nevnast:

**§ 2 Almanna- og heilsumál**
- Nýtt røktarheim við røktaríbúðum

**§ 3 Børn og ung**
- Býlingshúsið Vesturi á Flat
- Dagstovnurin á Hamrinum
- Dagstovnurin Hans Andrias Djurhuus, útbygging
- Umbygging av Miðstovninum í Kongagøtu

**§ 4 Undirvísng**
- Framhaldsdeild í Sankta Frans skúla
- Serstova í Skúlanum á Argjahamri

**§ 5 Mentan og frítíð**
- Langhyl
- Stórhøll
- Fimleika-/borgarahús í Kaldbak

**§ 6 Teknisk mál**
- Innkomuveg við íbindingum
- Miðbýarætlan/Havnará
- Græsagarður/spæliplláss
- Lendisgøtur
- Náttúruøki í Dalinum Langa
- Bústaðarútstykkingar omanfyri Argjahamar
- Bústaðarútstykkingar á Stórutjørn
- Vinnuútstykkingar á Ovara Hjalla
- Fleiri størri og smærri íløgur í ymsu ítróttaranleggini í kommununi.
- Fleiri størri vega- og kloakkverkætlanir
- Umframt fleiri størri og smærri íløgur í verandi stovnar

**Fíggjarætlanin 2025 hjá Tórshavnar Kommunu í tølum**

***Inntøkur***
Í fíggjarætlanini hjá Tórshavnar Kommunu fyri 2025 verða samlaðu inntøkurnar mettar til 1.417.891 tús. kr. Nógv tær størstu inntøkurnar koma frá vanliga lønarskattinum, sum verður mettur til 1.095.359 tús.kr. Eftir vanliga lønarskattin koma inntøkurnar frá eftirlønarskatti, sum í 2025 verða mettar til 228.443 tús. kr. Síðan koma felagsskatturin og endurgjaldið frá landinum fyri DIS, FAS og aðrar frádráttir á ávikavist 58.000 tús.kr. og 228.443 tús. kr.

Samlaði inntøkuvøksturin hjá Tórshavnar Kommunu í 2025 er sostatt 7,71%, samanborin við fíggjarætlanina 2024.

***Rakstrarútreiðslur***
Í fíggjarætlanini 2025 vera samlaðu rakstrarútreiðslurnar hjá Tórshavnar Kommunu, uttan Tórshavnar Havn, 1.111.068 tús. kr. Íroknað Tórshavnar Havn verða samlaðu rakstrarútreiðslurnar hjá Tórshavnar Kommunu 1.074.083 tús. kr. í 2025. Netto geva rakstrarinntøkurnar hjá Tórshavnar Havn kommunukassanum í Tórshavnar Kommunu umleið 37 mió. kr. í 2025.

Samlaði vøksturin í rakstarútreiðslunum hjá Tórshavnar Kommunu í 2025 er sostatt 7,59%, uttan Tórshavnar Havn, samanborin við fíggjarætlanina 2024. Lønarlyftið, sum Løgtingið hevur samtykt, kostaði Tórshavnar Kommunu næstan 14 mió. kr. í ár og verður mett at koma at kosta kommununi

umleið taða sama í 2025. Uttan lønarlyftið hevði samlaði vøksturin í rakstrarútreiðslunum hjá Tórshavnar kommunu frá 2024 til 2025 ligið um 6,2%.

***Rentur og avdráttir***
Í 2025 verða rentuútreiðslurnar og avdráttirnir hjá Tórshavnar Kommunu nakað minni í mun til fíggjarætlanina 2024. Samlaðu rentuútreiðslurnar verða mettar til 10.962 tús. kr. og samlaðu avdráttirnir verða mettir til 22.733 tús. kr. Hetta er uttan Tórshavnar Havn.

***Avlop til skattafíggjaðar íløgur hjá Tórshavnar Kommunu uttan Tórshavnar Havn***
Tá ið allar rakstrarútreiðslurnar, rentur og avdráttir eru drignar frá samlaðu inntøkunum hjá Tórshavnar kommunum og Tórshavnar Havn er tikin burtur úr, so eru 241.129 tús. kr. eftir til skattafíggjaðar íløgur hjá Tórshavnar Kommunu í 2025.

***Fíggjarstøðan hjá Tórshavnar Kommunu***
Fíggjarstøðan hjá Tórshavnar Kommunu er góð. Samlaða langfreistaða skuldin er í løtuni 350 mió kr. Skuldarlutfallið, sum er samlaða nettoskuldin í mun til skattaálíkningina hjá kommununi, liggur um 17%.

Orsaka av nógvu útstykkingunum í kommununi, bæði til privatar bústaðir og vinnulig endamál hevur kommunan ein kassakreditt til at tryggja gjaldførið. Hetta kemst av, at kommunan í fyrsta umfari leggur út fyri útstykkingarnar fyri síðan at fáa peningin innaftur, so hvørt stykkini verða selda og avhenda. Hetta kann taka nakað av tíð, og tí tyngir hetta um gjaldførið hjá kommununi meðan útstykkingarnar verða gjørdar klárar, og áðrenn kommunan endaliga hevur selt grundstykkini.

**Skjøl**
-

**Onnur mál, sum kunnu hava týdning fyri málið**
Fíggjarætlan hjá Tórshavnar Havn í 2025.

**Tilmæli:**
Sambært kommunustýrislógini skal fíggjarnevndin leggja uppskot til fíggjarætlan 2025 fyri býráðið innan 1. oktober 2024.

**Fíggjarnevndin 19. september 2024:** Uppskot til fíggjarætlan 2025 framlagt.

**Býráðsfundur 19. september 2024:** Framlagt.

**Mentamálanevndin 02. oktober 2024:** Framlagt og umrøtt.

**Trivnaðarnevndin 03. oktober 2024:** Framlagt og umrøtt.

**Vinnunevndin 03. oktober 2024:** Framlagt og umrøtt.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. oktober 2024:** Framlagt og umrøtt.

**Tekniska nevnd 07. oktober 2024:** Framlagt og umrøtt.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 08. oktober 2024:** Framlagt og umrøtt.

**Heilsu- og eldranevndin 08. oktober 2024:** Framlagt og umrøtt.

**Havnanevndin 10. oktober 2024:** Frmlagt og umrøtt.

**Fíggjarnevndin 23. oktober 2024:** Samtykt at taka undir við uppskotinum til fíggjarætlan og beina málið í býráðið til 1. viðgerð.

**Býráðsfundur 24. oktober 2024:** Einmælt samtykt við fyrstu viðgerð. Málið beint til aðru viðgerð.

**Ískoyti:**
Samlaðu inntøkurnar fyri 2025 verða nú mettar til 1.367 mió. kr., sum eru 8,8 mió. kr. hægri enn upprunaliga metingin á 1.359 mió. kr.

Kommunuskatturin verður 1,1 mia. kr., sum eru góðar 4,6 mió. kr. hægri enn upprunaliga mett. Samanborið við fíggjarætlanina 2024 vaksa skattainntøkurnar við 8,7% í fíggjarætlanini 2025. Orsøkin til stóra vøksturin kemst at, at skattainntøkurnar í ár verða væl hægri enn mett varð upprunaliga í fíggjarætlanini 2024. Um skattainntøkurnar í fíggjarætlanini 2025 verða samanbornar við nýggjastu metingina fyri 2024, nú bert eina mánaði er eftir av árinum, so er vøksturin í í skattainntøkunum 3,5%.

Nýggjastu metingarnar frá Fíggjarmálaráðnum vísa, at eftirlønarskatturin verður góðar 2,9 mió. kr. hægri enn í uppskotinum í september, góðar 231 mió. kr. samanborið við góðar 228 mió. kr. í september. DIS/FAS/frádráttir verða 933 t.kr. hægri enn í uppskotinum frá september og kommunu parturin hjá Tórshavnar Kommunu av veiðigjaldinum verður nú mettur til 800 t.kr., sum eru 300 t.kr. hægri enn í uppskotinum í september.

Í mun til upprunaliga uppskotið eru samlaðu rakstrarútreiðslurnar nú hækkaðar góðar 7,7 mió. kr.

Býráðið hevur á býráðsfundin tann 24. oktober 2024 samtykt at seta meira pening av til verkætlanarstarv til striking av dátum umframt eitt dátuverndar- og kt-trygdarstarv. Tí hækkar játtanin við 1,2 mió. kr. í mun til

upprunauppskotið í september. Eisini varð samtykt at játta 350 t.kr. á almanna- og heilsuøkinum til eitt Phd starv við Tjarnir.

900 t.kr. eru settar av, soleiðis at verandi virksemi við integratión, sum partvís snýr seg um integratión av flóttum úr Ukraina, kann halda fram. Nýggj lóg um integratión er eisini ávegis, sum nágreinar treytir og uppgávur um integratión.

Fyri at verandi virksemi kann halda fram á Familjustovuni á sosialu deild er tørvur á hægri játtan svarandi til 1.150 t.kr.

Fleiri smærri broytingar eru gjørdar í rakstrinum av skúlunum í sambandi við, at frískúlin í Havn varð niðurlagdur í oktober 2024.

Á skúlaøkinum eru harumframt fluttar 1 mió. kr. av rakstrinum yvir á løgusíðuna at gera uttanumøki við skúlar.

Konto 7110, Renovatión, verður hækkað við tilsamans 6,7 mió. kr. í mun til upprunaliga uppskotið frá september. Hetta kemst at, at jarnsølan nú verður mett til at fara at verða góðar 5,5 mió. kr. lægri í 2025 enn upprunaliga mett, og at býráðið í september 2024 samtykti tvey nýggj størv á hesi kontuni, svarandi til umleið 1,2 mió. kr. í 2025.

Upprunaliga vórðu settar 1,5 mió. kr. av til Koltursætlanina í 2025, men henda játtanin er nú strikað, tí uppskot er lagt fram um at játta 4,5 mió. kr. av meirinntøkunum í 2024 til Koltursætlanina.

Við omanfyristandandi broytingum í inntøkum og útreiðslum, verða høvuðstølini býtt uppá greinar broytt í mun til uppruna uppskotið, sum var lagt fram í september. Sí skjal nr. 24/07504-19 Høvuðstøl býtt á greinar.

| | Býráðsfundur<br>28. november 2024 | Blað nr.: 1193<br>Formansins merki: |
|---|---|---|

**Tilmæli:**
Stjórnin mælir til niðanfyristandandi broytingar av fíggjarætlanini:

| Deild | Navn | Uppskot áðrenn | Uppskot aftaná | Broyting |
|---|---|---|---|---|
| | **Inntøkur og rentur:** | | | |
| 20501 | Kommunuskattur | 1.095.359 | 1.099.983 | 4.624 |
| 20801 | Skattur af eftirlønarinngjøldum | 228.443 | 231.376 | 2.933 |
| 20802 | DIS, FAS og frádráttir | 34.389 | 35.322 | 933 |
| 20804 | Kommunanna partur av Veiðigjaldi | 500 | 800 | 300 |
| | **Íalt** | | | **8.790** |
| | **Rakstur:** | | | |
| 1311 | Dátuvernd og KT-trygd | 31.306 | 32.506 | **1.200** |
| 2461 | Stuðul til verkætlanir innan heilsu- og eldramál | 150 | 500 | **350** |
| 2512 | Integratión | 1.238 | 2.138 | **900** |
| 2614 | Familjustovan | 15.180 | 16.330 | **1.150** |
| | Undirvísing: | - | - | - |
| 4113 | Velbastaða skúli | 1.063 | 1.102 | **39** |
| 4118 | Eysturskúlin | 7.107 | 7.130 | **23** |
| 4119 | Sankta Frans skúli | 6.667 | 6.678 | **11** |
| 4121 | Skúlin á Argjahamri | 5.773 | 5.847 | **74** |
| 4126 | Forskúli til Lítlaskúla | 959 | 1.027 | **68** |
| 4140 | Ætlanir á skúlaøkinum | 2.164 | 2.258 | **94** |
| 4142 | Aðrar útreiðslur | 991 | 1.041 | **50** |
| 4124 | Frískúlin í Havn | 359 | 0 | **-359** |
| 4140 | Ætlanir á skúlaøkinum | 2.257 | 1.257 | **-1.000** |
| 7110 | Minni søla av jarni | 30.262 | 35.785 | **5.523** |
| 7110 | Tvey nýggj størv | 29.092 | 30.262 | **1.170** |
| 7710 | Koltursætlanin mál 23/03273 | 5.391 | 3.891 | **-1.500** |
| | **íalt** | | | **7.793** |
| | | | | |
| | **Samlað broyting í rakstri, íroknað inntøkur** | | | **997** |

**Fíggjarnevndin 27. november 2024:** Heðin Mortensen, borgarstjóri, legði fram soljoðandi uppskot til íløguætlan fyri 2025:

## Íløguætlan

| | | 2022<br>J | 2023<br>J | 2024<br>J | **2025**<br>**F** |
|---|---|---|---|---|---|
| **§2** | **Almanna- og heilsumál** | **9.000** | **17.000** | **0** | **62.000** |
| 2375 | Tannlæknamiðstøð | 1.000 | 1.000 | | |
| 2775 | Nýtt røktarheim við røktaríbúðum | 6.000 | 15.000 | | 50.000 |
| 2775 | Køkur Lágargarði | | | | 10.000 |
| 2775 | Eldradepil í Kollafirði | 1.000 | | | |
| 2775 | Røktarheim, uttanumøki | 1.000 | 1.000 | | |
| 2775 | Ellisheim, dagføring | | | | 2.000 |
| | | | | | |
| **§3** | **Børn og ung** | **34.000** | **7.000** | **14.900** | **62.000** |
| 3175 | Útbygging dagstovnurin á Hamrinum | 30.000 | 5.000 | 13.900 | 35.000 |
| 3175 | Frítíðarskúlin við Botnánna í Kollafirði | | | | 19.000 |
| 3175 | Tillagingar á dagstovnaøkinum | 4.000 | | 1.000 | 4.000 |
| 3175 | Dagstovnar, uttanumøki | | 1.000 | | 4.000 |
| 3175 | Dagføring frítíðarskúlar | | 1.000 | | |
| | | | | | |
| **§4** | **Undirvísing** | **3.900** | **22.500** | **18.000** | **12.000** |
| 4175 | Dagføring, Hoyvíkar skúli | 2.000 | 1.000 | | 10.000 |
| 4175 | Dagføring, Skúlin við Løgmannabreyt | 1.900 | | | |
| 4175 | Skúlin á Argjahamri serstova | | 1.500 | | |
| 4175 | Skúlar, uttanumøki | | | | 2.000 |
| 4176 | Framhaldsdeild í Sankta Frans | | 20.000 | 18.000 | |
| | | | | | |
| **§5** | **Mentan og frítíð** | **94.500** | **117.500** | **152.000** | **34.000** |
| 5175 | Musikkskúli | | 1.000 | | |
| 5275 | Kvøldskúlin | 2.000 | | | |
| 5475 | Býarbókasavn | 2.000 | | | |
| 5575 | Býarsavn - Gamla hospital | | | | 2.000 |
| 5775 | Langhylur | 40.000 | 54.000 | 84.000 | |
| 5775 | Golf | 4.500 | 2.500 | | 7.000 |
| 5775 | Fimleikahøll/Borgarahús í Kaldbak | 5.000 | 10.000 | 10.500 | |
| 5775 | Tórsvøllur | 13.000 | | | |
| 5775 | Byrsumúli/skjótibreyt | 5.000 | | | |
| 5775 | Stórhøll | 10.000 | 50.000 | 56.000 | 15.000 |
| 5775 | Fótbóltsvallir, Argir-Hoyvík | 10.000 | | | |
| 5775 | FC Hoyvík Felagshús og skýli | | | | 3.000 |
| 5775 | Gundadalshøllin | 1.000 | | | |
| 5775 | Innandura spælipláss | 1.000 | | | |
| 5775 | Frælsur ítróttur, Høll | 1.000 | | | 2.000 |
| 5775 | Ríðibreyt í Havnardali | | | 1.500 | |
| 5775 | Oyggjaleikir 2027, Ljós Tórsbreyt | | | | 4.000 |
| 5775 | Finsen fimleikahøll skiftingarrúm | | | | 1.000 |
| | | | | | |
| **§6** | **Teknisk mál** | **83.100** | **130.700** | **156.600** | **56.000** |
| 6175 | Umsiting og røkt av fastari ogn - Keyp av Kurlu | 1.200 | 1.200 | | |
| 6175 | Umsiting og røkt av fastari ogn - Søla | -3.100 | | | |
| 6177 | Orkupolitikkur - átøk | 8.000 | 8.000 | 6.000 | 8.000 |
| 6177 | Fjarhitafelagið | 15.000 | | | |
| 6275 | Torg frammanfyri FSF | | 2.000 | | |
| 6275 | Standmynd av Andreu Áting | | 1.000 | | |
| 6275 | Torg í Hoyvík | 1.000 | 2.000 | | |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 6275 | Vetrarfriðing í Kollafirði og Nólsoy | 1.000 | | | |
| 6275 | Viðarlundin, træplanting o.a. | 1.000 | | | |
| 6275 | Spælipláss, Grasagarð, Glaðsheygg o.a. | 5.000 | | | |
| 6275 | Miðbýarætlan | 8.000 | 10.000 | | 2.000 |
| 6275 | Lendisgøtur | 4.000 | | 2.000 | |
| 6275 | Fríðkan, bygdir og økir | 2.000 | 1.000 | | 2.000 |
| 6275 | Fríðkan av býnum | 5.000 | 3.000 | 3.000 | 3.000 |
| 6475 | Útstykking oman fyri Argjahamar, útreiðslur | | 30.000 | 21.000 | |
| 6475 | Utstykking oman fyri Argjahamar, inntøkur | | -30.000 | -21.000 | |
| 6575 | Kirkjugarðar | | | | 3.000 |
| 6575 | Kirkjugarðar,  í Kollafirði | | | | 1.000 |
| 6575 | Kapellið | | 5.000 | | |
| 6775 | Vatnreinsiverk í Havnardali | 1.000 | 1.000 | | 2.000 |
| 6875 | Kloakkir, spillivatnsætlan | 8.000 | 8.000 | 5.000 | 15.000 |
| 8175 | Innkomuvegur, útreiðsla | 10.000 | 108.000 | 105.700 | |
| 8175 | Innkomuvegur, inntøka | | -33.500 | -31.100 | |
| 8175 | Innkomuvegur, íbinding | | | 58.000 | |
| 8175 | Parkeringstunnil | | 3.000 | | |
| 8175 | Parkering | 3.000 | | | 2.000 |
| 8175 | Vegaverkætlanir | 8.000 | 6.000 | 5.000 | 7.000 |
| 8175 | Gongu- og súklubreytir | | | | 3.000 |
| 8175 | Vegagerð við Borgarahúsið í Kaldbak | | | | 1.500 |
| 8175 | Vegagerð Gerðisbreyt Velbastað | | | | 1.500 |
| 8375 | Rakstrargøgn | 5.000 | 5.000 | 3.000 | 5.000 |
| **§7** | **Kommunal virki** | **25.000** | **8.600** | **2.000** | **16.000** |
| 7175 | Renovatión | | | | 13.000 |
| 7175 | Renovatión, skiljihøll | 7.000 | 1.600 | | |
| 7476 | Smábátahavn Álakeri | 18.000 | | | |
| 7476 | Smábátahavn | | 3.500 | 1.000 | |
| 7476 | Smábátahavn, frítíðarøki Álakeri | | 3.500 | 1.000 | 3.000 |
| | | **249.500** | **303.300** | **343.500** | **242.000** |
| 7475 | Tórshavnar havn | 24.000 | 20.000 | 16.000 | 42.000 |
| | **Samanlagt** | **273.500** | **323.300** | **359.500** | **284.000** |

Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Elsa Berg og Annika Olsen, tekur undir við fyriliggjandi uppskoti til fíggjarætlan við teimum broytingum í fíggjarætlanini, sum eru lagdar fram av stjórnini umframt uppskotinum til íløguætlan fyri 2025, sum Heðin Mortensen, borgarstjóri hevur lagt fram.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, tekur støðu til fíggjarætlanina á býráðsfundinum.

**Býráðsfundur 28. november 2024:** Birgir Nielsen úr Fólkaflokkinum setti fram soljóðandi broytingaruppskot: Kommunuskattaprosentið í fíggjarætlanini fyri 2025 verður lækkað við 0,25 %-stigum úr 19,0% til 18,75%. Lækkingin, svarandi til 14,5 mió. kr., verður fíggjað við at lækka raksturin við 14,5 mió. kr.

Atkvøtt varð um broytingaruppskotið hjá Birgir Nielsen, ið fall við fimm atkvøðum fyri, seks atkvøðum ímóti og tveimum blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Birgir Nielsen, Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Súna Mørk og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Kristianna Winther Poulsen, Elsa Berg, Gunvør Balle, Jákup Dam, Annika Olsen.

Blankt atkvøddu: Súsanna Olsen og Birita Baldvinsdóttir Iversen.

Tróndur Sigurðsson setti fram soljóðandi broytingaruppskot: 7 mió. kr. verða fluttar av konto 8175, vegaverkætlanir, á konto 5775 nýtt felagshús til FC Hoyvík.

Atkvøtt varð um broytingaruppskotið frá Tróndi Sigurðsson, ið fall við seks atkvøðum fyri, seks atkvøðum ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Birgir Nielsen, Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Súna Mørk, Annfinn Brekkstein og Birita Baldvinsdóttir Iversen.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Kristianna Winther Poulsen, Elsa Berg, Gunvør Balle, Jákup Dam, Annika Olsen.

Blankt atkvøddi: Súsanna Olsen.

Tróndur Sigurðsson setti fram soljóðandi broytingaruppskot: 2 mió. kr. verða fluttar av konto 5775 golf yvir á konto 5370 markað til fótbóltsfeløgini HB og B36.

Atkvøtt varð um broytingaruppskotið frá Tróndi Sigurðsson, ið varð samtykt við sjey atkvøðum fyri og seks atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Birgir Nielsen, Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Súna Mørk, Annfinn Brekkstein, Birita Baldvinsdóttir Iversen og Súsanna Olsen.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Kristianna Winther Poulsen, Elsa Berg, Gunvør Balle, Jákup Dam, Annika Olsen.

Annfinn Brekkstein legði fram soljóðandi broytingaruppskot: Fluttar verða 2 mió. kr. av konto 6275, Miðbýarætlanin, og 1 mió. kr. av konto 8175, Parkering, yvir á grein 3 við tí endamáli at taka leiðslunormeringina úr normeringini á dagstovnaøkinum.

Atkvøtt varð um broytingaruppskotið frá Annfinni Brekkstein, ið varð samtykt við sjey atkvøðum fyri og seks atkvøðum ímóti:

Fyri atkvøddu: Birgir Nielsen, Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Súna Mørk, Annfinn Brekkstein, Birita Baldvinsdóttir Iversen og Súsanna Olsen.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Kristianna Winther Poulsen, Elsa Berg, Gunvør Balle, Jákup Dam, Annika Olsen.

Súna Mørk legði fram soljóðandi broytingaruppskot: 10 mió. kr. verða fluttar av konto 2775, nýtt røktarheim við røktaríbúðum í Stórubrekku, til viðlíkahald av Gundadalshøllini, konto 5775.

Atkvøtt varð um broytingaruppskotið frá Súnu Mørk, ið fall við seks atkvøðum fyri, seks atkvøðum ímóti og einari blankari atkvøðu:

Fyri atkvøddu: Birgir Nielsen, Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Súna Mørk, Annfinn Brekkstein og Birita Baldvinsdóttir Iversen.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Kristianna Winther Poulsen, Elsa Berg, Gunvør Balle, Jákup Dam, Annika Olsen.

Blankt atkvøddi: Súsanna Olsen.

Súna Mørk legði fram soljóðandi broytingaruppskot: 1 mió. kr. verða fluttar av konto 6275, Fríðkan av býnum á verkætlan Skúla- og dagstovnasosialráðgevarar og SSP.

Atkvøtt varð um broytingaruppskotið frá Súnu Mørk, ið varð samtykt við sjey atkvøðum fyri, seks atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Birgir Nielsen, Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Súna Mørk, Annfinn Brekkstein, Birita Baldvinsdóttir Iversen og Súsanna Olsen.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Kristianna Winther Poulsen, Elsa Berg, Gunvør Balle, Jákup Dam, Annika Olsen.

Kári Johansen legði fram soljóðandi broytingaruppskot: 500.000 kr. verða fluttar av konto 6275, Fríðkan, bygdir og økir, til at tryggja betri busssamband við Hestleiðina, konto 7510, Bussleiðin.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið frá merilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við sjey atkvøðum fyri, seks atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Birgir Nielsen, Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Súna Mørk, Annfinn Brekkstein, Birita Baldvinsdóttir Iversen og Súsanna Olsen.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Kristianna Winther Poulsen, Elsa Berg, Gunvør Balle, Jákup Dam, Annika Olsen.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini við omanfyri samtyktu broytingum, einum óbroyttum skattaprosentið á 19,0% og einum barnafrádrátti áljóðandi 9.000 kr.

Uppskotið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri, einari ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Kristianna Winther Poulsen, Elsa Berg, Gunvør Balle, Jákup Dam, Annika Olsen, Birgir Nielsen, Súna Mørk, Annfinn Brekkstein, Birita Baldvinsdóttir Iversen og Súsanna Olsen.

Ímóti atkvøddi: Tróndur Sigurðsson.

Blankt atkvøddi: Kári Johansen.

## 289/24 Umbøn um eykajáttan av meirinntøkum 2024

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 23.10.2024 | 258/24 | 24/08061-1 |
| 2 Býráðsfundur | 24.10.2024 | 259/24 | 24/08061-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 27.11.2024 | 281/24 | 24/08061-1 |
| 4 Býráðsfundur | 28.11.2024 | 289/24 | 24/08061-1 |

**Upprunin til málið**
Fíggjardeildin hevur dagført metingina av inntøkunum hjá kommununi pr. 30. september 2024. Metingin vísir størri inntøkur í mun til upprunaligu játtanina, og sambært játtanarreglunum skulu inntøkurnar í upprunaligu fíggjarætlanini tí dagførast við eykajáttan. Hendan umbønin um eykajáttan fevnir harumframt um ymsar meirútreiðslur, sum býráðið er samt um at fíggja av staðfestum meirinntøkum í 2024.

**Lýsing av málinum**
Nýggja inntøkumetingin hjá Fíggjardeildini, pr. 30. september 2024, vísir, at inntøkurnar vera umleið 60 mió. kr. hægri enn mett var í upprunaligu fíggjarætlanini hjá kommununi. Hetta kemst av, at bæði inntøkuskattur og felagsskattur nú vísa seg at vera hægri enn upprunaliga mett.

Av meirinntøkunum á 60 mió. kr. er býráðið samt um at brúka tilsamans 58 mió. kr. av meirinntøkunum soleiðis:

| | |
|---|---|
| Stuðul til Sjósavnið samtykt á býráðsfundi 23. februar 2023 | 15.000 t.kr. |
| Lønarlyft o.a. samtykt á býráðsfundi 19. september 2024 | 17.000 t.kr. |
| Standmynd Andrea Árting samtykt á býráðsfundi 19. september 2024 | 1.275 t.kr. |
| Eykajáttan til 7110 er løgd fyri Náttúru- og umhvørvisnevndina | 14.000 t.kr. |
| Innkomuvegur | 8.400 t.kr. |
| Innkomuvegur íbindingar | 2.300 t.kr. |
| **Tilsamans** | **57.975 t.kr.** |

Býráðið samtykti á býráðsfundi tann 23. februar 2023 tilsøgn at játta Føroya Sjósavni 15 mió. kr. í fíggjarætlanini 2024 til at byggja nýtt sjósavn á Argjum. Tilsøgnin er galdandi til 31. desember 2024 og útgjald er treytað av, at øll loyvi til byggingina eru fingin til vega. Víst verður til mál nr. 17/00792 Føroya Sjósavn.

Løgtingið hevur samtykt at veita útvaldum lønarbólkum lønarlyft. Lønarlyftið verður mett at kosta Tórshavnar Kommunu umleið 14 mió. kr. í ár. Býráðið samtykti tí á býráðsfundi tann 19. september 2024 at játta 13,8 mió. kr. til lønarlyftið og aðrar 3,1 mió. kr. til ymsar stuðulskontur, tilsamans 16,9 mió. kr. Samtykt var, at upphæddin skal fíggjast av staðfestum meirinntøkum í 2024. Víst verður til mál nr. 24/03276 Eykajáttan, lønarlyft og samtyktar stuðulsútreiðslur

Á býráðsfundi tann 19. september 2024 samtykti býráðið at játta írestandi 1.274 t.kr. til standmyndina av Andreu Árting av staðfestum meirinntøkum í 2024. Víst verður til mál nr. 18/04076 Møgulig standmynd/minnismerki um Andreu Árting.

Fíggjarnevndin samtykti á fundi tann 9. oktober 2024 at taka undir við tilmæli frá Náttúru- og umhvørvisnevndini, um at mæla býráðnum til at játta konto 7110, renovatión, 14 mió. kr. í eykajáttan av staðfestum meirinntøkum í 2024. Víst verður til mál 24/01451 Umbøn um eykajáttan til konto 7110.

Tekniska nevnd samtykti á fundi tann 7. oktober 2024 at mæla fíggjarnevndini til at koyra tvær umbønir um eykajáttan í býráðið til viðgerðar. Onnur eykajáttanin á 8,4 mió. kr. er til nýggja innkomuvegin og hin eykajáttanin á 2,3 mió. kr. er til íbindingar til nýggja innkomuvegin. Víst verður til mál nr. 21/02196 og mál nr. 23/03480.

**Lógir, ásetingar o.a.**
-

**Upplýsingar frá umsitingini**
-

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
24/03276 Eykajáttan, lønarlyft og samtyktar stuðulsútreiðslur
17/00792 Føroya Sjósavn
18/04076 Møgulig standmynd/minnismerki um Andreu Árting
24/01451 Umbøn um eykajáttan til konto 7110
21/02196 Uppskot til stuðulslóg til nýggjan uttara ringveg og uppskot til uppskot til avtalu við TK
23/03480 Innkomuvegur – íbindingar o.a.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
-

**Skjøl**
-

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☒
Lokað verkætlan ☐

| Navn | Deild | Verk-ætlan | Navn | Upphædd |
|---|---|---|---|---|
| Meirinntøkur 2024 | 20501 | | Kommunuskattur | -40.000.000 |
| Meirinntøkur 2024 | 20601 | | Felagsskattur | -20.000.000 |
| Meirinntøkur 2024 | § 2 § 3 | | Lønarlyft o.a. | 17.000.000 |
| Meirinntøkur 2024 | 7110 | | Renovatión | 14.000.000 |
| Meirinntøkur 2024 | 5370 | | Sjósavnið | 15.000.000 |
| Meirinntøkur 2024 | 6275 | L62038 | Standmynd Andrea Árting | 1.275.000 |
| Meirinntøkur 2024 | 8175 | L81037 | Innkomuvegur | 8.400.000 |
| Meirinntøkur 2024 | 8175 | L81054 | Innkomuvegur íbindingar | 2.300.000 |

**Tilmæli:**
Stjórnin mælir fíggjarnevndini til at taka undir við omanfyristandandi uppskoti til eykajáttan og at beina málið í býráðið til tvær viðgerðir.

**Fíggjarnevndin 23. oktober 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið sum eykajáttanarmál, ið tørvar tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 24. oktober 2024:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Eftir at hava endurskoðað inntøkumetingina fyri 2024, nú skjótt 11 mánaðir eru farnir av árinum, fer Fíggjardeildin við hesum at mæla til at hækka inntøkumetingina frá 30. september 2024 við 15 mió. kr., soleiðis at samlaða inntøkumetingin fyri 2024 nú er hækkað við 75 mió. kr. samanborið við upprunaligu inntøkumetingina, ið varð gjørd, tá ið farið var inn í 2024.

Samstundis verður mælt til at brúka góðar 14 mió. kr. av hesum meirinntøkum sum niðanfyri lýst.

7,6 mió. kr. til framflutta meirnýtslu á dagstovnaøkinum undir § 3. Orsøkirnar til hallið eru fleiri. 2023 var fyrsta árið, har fari var frá fíggjarjáttan til tímajáttan úti á stovnunum. Somuleiðis varð latið upp fyri, at fleiri hjálparfólk kundi setast fyri manglandi námsfrøðingar. Eisini var starvsaldurin fyri námsfrøðingar og hjálparfólk settur í so lágt.

4,5 mió. kr. til Koltursætlanina. Býráðið samtykti á býráðsfundi tann 21. juni 2023 at seta av 1,5 mió. kr., árini 2024, 2025 og 2026, til Koltursætlanina, sí mál nr. 23/03273 Hvønn leiklut skal Tórshavnar kommuna hava í Koltursætlanini?

1,95 mió. kr. til umskipan av mentanarstuðli Tórshavnar Býráðs. Fíggjarnevndin samtykti á fundi tann 6. november 2024 at taka undir við mentamálanevndini, um at umskipa og hækka mentunarstuðul Tórshavnar Býráðs við 1,95 mió. kr. og beina málið víðari í býráðið sum eykajáttan, sí mál nr. 23/06811 Umskipan av mentanarstuðli Tórshavnar Býráðs.

Sí annars talvuna niðanfyri.

| Navn | Deild | Verkætlan | Navn | Upphædd |
|---|---|---|---|---|
| Meirinntøkur 2024 | 20501 | | Kommunuskattur | -15.000.000 |
| Meirinntøkur 2024 | 3102-3305 | | Børn og ung | 7.600.000 |
| Meirinntøkur 2024 | 7710 | 77002 | Koltursætlanin | 4.500.000 |
| Meirinntøkur 2024 | 5363-53XX | | Mentunarstuðul Tórshavnar Býráðs | 1.950.000 |

**Tilmæli:**
Stjórnin mælir fíggjarnevndini til at taka undir við omanfyristandandi broytingaruppskoti til eykajáttan og at beina málið við til aðru viðgerð, har dagførda inntøkumetingin og eykajáttanirnar í talvuni í omanfyristandandi broytingaruppskoti verða lagdar afturat talvuni í upprunauppskotinum í hesum málinum, sum varð einmælt samtykt á býráðsfundi tann 24. oktober 2024.

**Fíggjarnevndin 27. november 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum við teirri broyting, at játtaðar verða 2 mió. kr. á konto 3212 og 900 t.kr. verða játtaðar á konto 3218. Málið beint í býráðið til aðru viðgerð.

**Býráðsfundur 28. november 2024:** Einmælt samtykt við aðru viðgerð.

## 290/24 Móttøka av gróti frá Eysturoyartunlinum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vinnunevndin | 02.05.2016 | 22/16 | 16/01798-1 |
| 2 Vinnunevndin | 30.05.2016 | 26/16 | 16/01798-1 |
| 3 Vinnunevndin | 31.10.2016 | 39/16 | 16/01798-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 16.11.2016 | 379/16 | 16/01798-1 |
| 5 Býráðsfundur | 30.11.2016 | 310/16 | 16/01798-1 |
| 6 Kaldbaksnevndin | 04.12.2017 | 12/17 | 16/01798-1 |
| 7 Vinnunevndin | 15.05.2017 | 33/17 | 16/01798-1 |
| 8 Vinnunevndin | 29.05.2017 | 38/17 | 16/01798-1 |
| 9 Býráðsfundur | 20.06.2017 | 182/17 | 16/01798-1 |
| 10 Vinnunevndin | 06.11.2017 | 59/17 | 16/01798-1 |
| 11 Fíggjarnevndin | 15.11.2017 | 257/17 | 16/01798-1 |
| 12 Býráðsfundur | 22.11.2017 | 260/17 | 16/01798-1 |
| 13 Havnanevndin | 29.10.2024 | 33/24 | 16/01798-1 |
| 14 Fíggjarnevndin | 06.11.2024 | 271/24 | 16/01798-1 |
| 15 Býráðsfundur | 28.11.2024 | 290/24 | 16/01798-1 |

**Málslýsing:**
P/F Eysturoyar- og Sandoyartunlar hava vent sær til Tórshavnar havn/ kommunu um móttøku av gróti frá Eysturoyartunlinum.
Samlaða nøgdin av tilfari, sum kemur út á Hvítanesi, er umleið 570.000 $m^3$ í innbygdum máti.
Ein møguleiki, sum hevur verið nevndur, er at brúka grótið til tað ætlaðu víðkanina av Eystaru bryggju, men hetta er neyvan nøkur góð loysn, um grótið skal koyrast. Hetta viðførir nógvan ampa bæði á vegunum og á havnalagnum.

Annar møguleikin er at sigla grótið, men hetta er heldur ikki ein løtt og bílig loysn, tí so skal grótið koyrast inn á bryggjuna á Sundi, ella má ein arbeiðskaj gerast nær við munnan á Hvítanesi. Hartil kemur, at tað er ikki ein góð farleið at sigla frá Hvítanesi til Tórshavn, har tað kann vera óslætt at sigla um veturin.

Triðji møguleikin er at koyra grótið niðan á Sund, og fylla tað út á sjógv eystan fyri verðandi bryggju á Sundi.
Um fylt verður upp eystan fyri bryggjuna á Sundi, verður hetta til eitt umleið 50.000 $m^2$ stórt øki. Ein stórur partur av tilfarinum verður fylt út á sjógv, har teir fyrstu 250 m av lendinum á landi er ogn hjá Tórshavnar kommunu, meðan teir eystastu 150 m hoyra til Sundshaga uttari partur.
Av tí at tað kann vera ókyrt inni á Sundi, er neyðugt at verja útfyllingina við stórum gróti.
Av tí at talan er um stórar nøgdir, blívur tað kostnarmikið fyri Tórshavnar havn, um tað skal gjaldast fyri koyring, móttøku og ger av verjugarði.
Tá økið er liðugt, kann hetta brúkast sum ídnaðarøki til fyritøkur, sum hava tørv á at liggja nær við sjógv og bryggjukant.
Umsitingin er við at kanna um loyvi fæst frá friðingarnevndini og Umhvørvisstovuni til útfyllingina á Sundi.

**Tilmæli frá havnarmeistarinum**: Støða má takast til, um tað skal arbeiðast víðari við ætlanini at taka móti gróti frá Eysturoyartunlinum, og undir hvørjum treytum tað verður tikið móti grótinum.

**Vinnunevndin 02. mai 2016:** Samtykt at arbeiða víðari við ætlanini.

**Ískoyti:**
P/F Eysturoyartunnilin  ynskir teir eitt svar frá Tórshavnar kommunu, um áhugi er at taka móti grótinum.

Treytirnar frá Eysturoyartunnlinum eru, at tað er móttakarin, sum rindar fyri flutningin av grótinum frá tunnilsmunnanum, og fyri móttøku har sum grótið verður lagt.

Prísurin fyri flutning verður ikki kendur, fyrr enn tilboðini upp á tunnilin verða opnað.
Kostnaðarmetingin fyri arbeiðið, uttan leiðingar instalatiónir og asfaltering, er 25 mió fyri alt økið, sum verður umleið 50.000 $m^2$.

Um avgjørt verður at taka móti grótinum, má byggisamtyktin víðkast til eisini at umfata tað uppfylta økið.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og havnarmeistarin mæla til at taka ímóti grótinum og fylla upp eystan fyri verðandi bryggju á Sundi.
Endalig støðutakan verður tikin til málið, tá samlaði kostnaðurin er kendur.
Íløgan verður fíggjað av íløgukarminum hjá Tórshavnar havn fyri 2016, 2017 og 2018.

**Vinnunevndin 30. mai 2016:** Samtykt at taka ímóti grótinum, men ikki gjalda fyri flutningin.

**Vinnunevndin 30. mai 2016:** Samtykt at taka ímóti grótinum, men ikki gjalda fyri flutningin.

**Ískoyti:**
Tilboðini eru nú komin upp á at gera Eysturoyartunnilin, og kostnaðurin fyri flutning av grótinum er tí kendur.

Tann samlaða nøgdin av tilfari er nú millum 320 – og 377.000 $m^3$ í føstum máti.

Aftan á samráðingar við Eysturoyartunnilin, verður mett, at kostnaðurin fyri arbeiðið, uttan leiðingar, installatiónir og asfaltering, er 13,5 mió fyri alt økið, sum verður umleið 50.000 $m^2$ til víddar.

Loyvi er fingið frá friðingarnevndini og Umhvørvisstovuni til útfyllingina.

Ein stórur partur av tilfarinum verður fylt út á sjógv,umleið 400 m eystur frá verandi havnaøki á Sundi har teir fyrstu 250 m av lendinum á landi er ogn hjá Tórshavnar kommunu, sum eigur eina 100 m breiða ál fram við sjóvarmálanum, meðan teir eystastu 150 m hoyra til Sundshaga uttari partur.

Um arbeiðið skal setast í verk, er neyðugt at víðka byggisamtyktina fyri havnaøkið á Sundi, til eisini at umfata tað uppfylta økið.
Um avgerð verður tikin um at taka ímóti grótinum, hevur tað skund at fáa byggisamtyktina víðkaða, tí arbeiðið byrjar um ársskifti.

**Tilmæli:**
Havnarmeistarin mælir til at taka ímóti grótinum og fylla upp eystan fyri verandi bryggju á Sundi.

At víðka byggisamtyktina fyri havnarøkið á Sundi til eisini at umfata tað útfylta økið.

At keypa eina 100 m breiða ál av teimum eystastu 150 metrunum, sum hoyra til Sundshaga uttari partur.

At játta 13,5 mió. til tað samlaða projektið, at fíggja av íløgukarminum hjá Tórshavnar havn fyri 2017, 2018 og 2019.

**Vinnunevndin 31. oktober 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 16. november 2016:** Samtykt at taka undir við vinnunevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 30. november 2016:** Einmælt samtykt.

**Vinnunevndin 15. mai 2017:** Nevndin heitir á havnameistarin um at koma við eini kostnaðarmetan av at varðveita Sundsánna.

**Ískoyti:**
Um nýggja útfyllingin byrjar 30 m eystan fyri verandi havnarlag, og vegur veður gjørdur yvir um ánna beint niðan fyri verðandi brúgv, er kostnaðurin 180 t.kr. lægri, enn um økini verða bygd saman.

Ein nýggj brúgv yvir um ánna, er mett at kosta 2 mió.

**Vinnunevndin 29. mai 2017:**
Ein meiriluti: Bogi Andreasen, Jákup Dam og Gunvør tekur undir við broytingini um at varðveita Sundsá.

Ein minniluti: Annfinn Brekkstein helur fast við upprunaverkætlanina.

**Ískoyti:**
Javnaðarflokkurin og sambandsflokkurin í Tórshavnar býráð biðja um at fáa málið á skrá.

**Býráðsfundur 20. juni 2017:** Atkvøtt varð um tilmæli frá Anniku Olsen, um at enda orðaskifti, ið varð samtykt við 7 atkvøðum fyri og 6 ímóti.

Fyri atkvøddu:
Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen, Súsanna Olsen og Gunvør Balle.

Ímóti atkvøddu:
Annfinn Brekkstein, Halla Samuelsen, Helena Dam á Neystabø, Bjørghild Djurhuus, Tróndur Sigurðsson og Heðin Mortensen.

Annfinn Brekkstein, Halla Samuelsen, Helena Dam á Neystabø, Bjørghild Djurhuus, Tróndur Sigurðsson og Heðin Mortensen mótmæltu, at teirra áheitan ikki kom til atkvøðugreiðlsu, um at grótið úr Eysturoyartunnlinum verður brúkt til innkomuvegin beinanvegin, sambært avtalu við Samferðsluráðið, Tunnilsfelagið og Tórshavnar býráð, sum býráðssamtykt er gjørd um og at grótfyllan á Sundi eigur at steðgast fyribils, soleiðis at høvið verður til at finna eina heildarloysn fyri hesum ídnaðarøki

**Ískoyti:**
Økið, sum verður fylt út á Sundi í sambandi við móttøku av gróti frá Eysturoyartunnlinum, kemur umleið 400 metur eystur frá verandi havnarøki á Sundi.
Teir fyrstu 250 m fram við landi eru ogn hjá Tórshavnar kommunu, meðan teir eystastu 180 metrarnir hoyra til Sundshaga uttari partur.
Í fyrispurningi til Búnaðarstovuna, ber til keypa 180 metur av fjøruni, ella 2.000 fermetur fyri kr. 229.600.
Keypið verður fíggjað av játtanini fyri móttøku av gróti frá Eysturoyartunnlinum.

**Tilmæli frá havnarmeistaranum:** Mælt verður til at keypa 2.000 fermetrar av fjøruni frá Búnaðarstovuni fyri kr. 229.600, at fíggja av játtanini fyri móttøku av gróti frá Eysturoyartunnlinum.

**Vinnunevndin 06. november 2017:**
Ein meiriluti: Bogi Andreasen, Gunvør Balle, Annfinn Brekkstein, Jákup Dam tekur undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

Ein minniluti: Heðin Mortensen tekur støðu á seinni fundi.

**Fíggjarnevndin 15. november 2017:** Samtykt at taka undir við vinnunevndini og beina málið í býráðið.

Tróndur Sigurðsson luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 22. november 2017:** Samtykt við 8 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass, Annfinn Brekkstein og Gunvør Balle.

Atkvøddu blankt: Halla Samuelsen, Helena Dam á Neystabø, Bjørghild Djurhuus, Tróndur Sigurðsson og Heðin Mortensen.

**Kaldbaksnevndin 04. desember 2017:** Kunnað varð um málið. Nevndin ynskir samstundis at ynski bóndans verður tikið til eftirtektar.

**Ískoyti:**
Keypið av jørð sambært samtyktini 22. november 2017 varð endaliga avgreitt í 2024.
Verkætlanin er sostatt liðug og kann lokast. Eftir av løgujáttanini P28 "Eysturoyartunnil – útfylling Sund" eru kr. 108.308.

**Tilmæli**
Stjórin í Tórshavnar havn mælir til, at verkætlanin P28 "Eysturoyartunnil – útfylling Sund" verður lokað; at avlopið á tkr. 108 verður flutt aftur á løgukarmin hjá Tórshavnar havn; og at málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

.

**Havnanevndin 29. oktober 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 06. november 2024:** Samtykt at taka unir við havnanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. november 2024:** Einmælt samtykt.

# 291/24 Víðkan av Skansabryggjuni - útbygging norðureftir

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Havnanevndin | 14.02.2022 | 10/22 | 22/00638-1 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 04.04.2022 | 97/22 | 22/00638-1 |
| 3 Tekniska nevnd | 04.04.2022 | 36/22 | 22/00638-1 |
| 4 Havnanevndin | 13.06.2023 | 17/23 | 22/00638-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 14.06.2023 | 184/23 | 22/00638-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 20.09.2023 | 238/23 | 22/00638-1 |
| 7 Havnanevndin | 03.10.2023 | 31/23 | 22/00638-1 |
| 8 Fíggjarnevndin | 18.10.2023 | 277/23 | 22/00638-1 |
| 9 Býráðsfundur | 26.10.2023 | 259/23 | 22/00638-1 |
| 10 Havnanevndin | 04.06.2024 | 21/24 | 22/00638-1 |
| 11 Havnanevndin | 29.10.2024 | 34/24 | 22/00638-1 |
| 12 Fíggjarnevndin | 06.11.2024 | 272/24 | 22/00638-1 |
| 13 Býráðsfundur | 28.11.2024 | 291/24 | 22/00638-1 |

**Upprunin til málið**

**Lýsing av málinum**

Núverandi útbygging av Skansabryggjuni og eystara havnaøki skuldi upprunaliga fevna um eitt øki á umleið 163.000 m$^2$. Útbyggingarætlanin varð tó tillagað og minkað niður í 95.000 m$^2$.

Nýggja havnaøkið minkaði við hesi tillaging sostatt umleið 68.000 m$^2$ í mun til upprunaligu ætlanina, og tað minkar sjálvsagt um nyttuna og møguleikarnar at skipa havnaøkið nøktandi í mun tey krøv og ynskir sum eru til farmaflutning og uttanlandssigling, serliga í framtíðini.
Ein onnur avleiðing av hesi broyting er eisini, at ætlanin at gera nýggian til- og frákoyringarveg millum havnalagið og ringvegin ikki kundi fremjast.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

<u>Umhvørvis-árinsmeting:</u>
Árinsmeting (VVM redegørelse), sambært § 21 í løgtingslóg um Havumhvørvi, varð gjørd útfrá tí upprunaligu útbyggingarætlanini á 163.000 m$^2$. Árinsmetingin lýsir m.a. grundarlagið og tørvin á útbyggingini, umframt árinini á umhvørvi og náttúru. Árinsmetingin varð send Umhvørvisstovuni til góðkenningar hin 26. juni 2014 (j.nr. 14/00893-7). Árinsmetingin fór síðani til almenna hoyring. Inn komu 7 hoyringsskriv, sum vórðu viðgjørd í “Hvítubók”, ið varð send Umhvørvisstovuni til góðkenningar 4. mai 2015 (j.nr. 14/00893-12). Umhvørvisstovan sendi hin 30. juli 2015 Tórshavnar havn uppskot til góðkenning av árinsmetingini av upprunaligu útbyggingarætlanini (j.nr. 14/00893-13), men Tórshavnar havn boðaði hin 21. oktober 2015 Umhvørvisstovuni frá, at ætlanin nú var minkað munandi. Umhvørvisstovan góðkendi árinsmetingina hin 26. november 2015 (j.nr.14/00893-17), og Heilsu- og Innlendismálaráðið hevur seinni staðfest avgerðina hjá Umhvørvisstovuni.

<u>Fornminnismyndugleikin:</u>

Fornminnisnevndin, ið er tilmælandi nevnd hjá landsstýrismanninum í mentamálum í sambandi við friðing av fornminnum, varð kunnað um útbyggingarætlanina. Fornminnisnevndin kom við sínum viðmerkingum á fundi hin 12. juni 2013 (j.nr. 14/00894-1). Viðmerkingarnar snúðu seg í høvuðsheitum um at varðveita sjóvarklettin niðanfyri Skansan, og at útsýnið av Skansanum út yvir nýggja pakkhúsøkið verður so frítt sum gjørligt út á sjógv.

Náttúrufriðingarmyndugleikin:
Nátturðufriðingarnevndin fyri Streymoyar sýslu viðmælti ætlanini í skrivi dagfest 7. januar 2014 (j.nr. 2013-02873/2 og j.nr. 14/01732-5).
Yvirfriðingarnevndin gav í skrivi dagfest 10. juni 2014 (j.nr. 14/01732-9) fyribils loyvi til havnaútbygging á ætlaða staðnum, tó við teirri treyt, at tilevning og útsjónd skuldu góðkennast endaliga í Yvirfriðingarnevndini.
Eftir ávísa almenna umrøðu av útbyggingini, fór í 2015 fram eitt ávíst samskifti og fundir við Yvirfriðingarnevndina viðvíkjandi hvussu treytirnar í fyribils loyvinum kundu lúkast, serliga viðvíkjandi bygningunum, ið skuldu standa framman fyri Skansan.
Í hesi tilgongdini sendi Mentamálaráðið, ið vegna Føroya Landsstýri varðar av Skansanum, Yvirfriðingarnevndini drúgt hoyringsskriv, ið mótmælti ætlanini (j.nr. 14/01732-19).
Viðgerðin av málinum í yvirfriðingarnevndini dró út, uttan at Yvirfriðingarnevndin kom til nakra niðurstøðu í málinum um upprunaligu útbyggingarætlanina.
Fyri at útbyggingin av Skansabryggjuni ikki skuldi fara fyri skeyti ella verða seinkað uppaftur meiri, avgjørdi Tórshavnar kommuna at tillaga útbyggingarætlanina soleiðis, at útfyllingin undir Skansanum bleiv tikin burturúr ætlanini, sum harvið minkaði úr 163.000 $m^2$ niður í uml. 95.000 $m^2$.
Hendan avgerðin varð fráboðað Yvirfriðingarnevndini 20. oktober 2015 (j.nr. 14-01732-20), og hin 23. desember 2015 varð endaligt loyvi til hesa minkaðu útbyggingarætlanina fingið frá Yvirfriðingarnevndini (j.nr. 14/01732-25).

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
J.nr. 14/00893-7 : Árinsmeting
J.nr. 14/00893-12 : Hvítabók

- J.nr. 14/00893-13: Umhvørvisstovan – Uppskot til góðkenning av árinsmeting
- J.nr. 14/00893-17: Umhvørvisstovan – Góðkenning av árinsmeting
- J.nr. 14/00894-1 : Søvn Landsins – Fundarfrágreiðing við Søvn Landsins
- J.nr. 2013-02873/2 og J.Nr. 14/01732-5: Viðmæli frá Nátturðufriðingarnevndin fyri Streymoyar sýslu
- J.nr. 14/01732-9: Yvirfriðingarnevndin: Fyribils loyvi
- J.nr. 14/01732-19: Mentamálaráðið : Hoyringsskriv
- J.nr. 14-01732-20: Tórshavnar Havn – fráboðan til Yvirfriðingarnevndina um minkaða ætlan
- J.nr. 14/01732-25: Yvirfriðingarnevndin : Endaligt loyvi til minkaðu útbyggingarætlanina

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Havnarmeistarin mælir til, at farið verður undir at útvega neyðugu loyvini til at útbyggja Skansabryggjuna sambært upprunaligu ætlanini, og at neyðug fyrireikingararbeiðir kunnu verða gjørd í hesum sambandi.

Klik eller tryk her for at skrive tekst.

**Havnanevndin 14. februar 2022:**

**Ein meiriluti:** Kári Johansen, Annfinn Brekkstein og Birgir Nielsen tekur undir við tilmælinum.

**Ein minniluti:** Elsa Berg tekur ikki undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Í sambandi við at arbeiðið at byggja nýggju ídnaðarkeiina er komið væl áleiðis, og økið verður endaliga skipað í mun til ætlaða virksemið á økinum, er málið um víðkan av Skansabryggjuni aftur komið á dagsskrá. Ásannast má, at serliga til- og frákoyringin frá havnaøkinum ikki er nøktandi til nógva virksemið í økinum, umframt at nógva virksemið á økinum krevur enn meiri pláss.

Býarskipanardeildin hevur havt málið til umrøðu, og verður mett, at enn ein útbygging av havnaøkinum eigur at verða fyrireikað í tøttum samstarvi við allar áhugapartar. Tá núverandi útbygging var til politiska viðgerð fyri nøkrum árum síðani, tá var stór mótstøða ímóti útbyggingini, serliga í mun til Skansan og fornminnini kring Skansan.

Áðrenn endalig støða verður tikin til enn eina møguliga útbygging av havnaøkinum, verður mett neyðugt at ymisku atlitini verða neyvt lýst, soleiðis at tørvurin á útbyggingini verður væl grundaður. Somuleiðis fer býarskipanardeildin at mæla til, at skipað verður fyri einum tiltaki, har allir áhugapartar leggja síni sjónarmið fram fyri at tryggja eina góða og fakliga tilgongd í málinum.

**Útbygging av økinum uttanfyri Skansan**
Í øðrum býum er vanligt, at søguligir havnaskansar so líðandi verða innilokaðir so ella so av einum vaksandi býi. Her kann til dømis nevnast skansin í Bergen (Bergenhus), skansin í Halifax, Krongborg í Helsingør og Kastellet í Keypmannahavn.

Sí skjal Útbygging av økinum uttanfyri Skansan_25marts22.pdf, j.nr. 22/00638-10, sum sýnir dømir um innilokan av skansum í øðrum býum.

Í øllum hesum fordømum er dentur lagdur á, at søguligir skansar fáa ein nýggjan týdning í býarmyndini, har teir eitt nú gerast meira atkomuligir og miðsavnandi fyri kringliggjandi býarumhvørvið.

Á sama hátt kann tá hugsast, at um Skansin varð innigyrdur í einum hóskandi og virðiligum maritimum umhvørvi, kundi hann fingið ein nýggjan býarskipanarligan týdning fyri býin, har eitt nú Skansahellan kundi verið varðveitt í einum kyrrum bátahyli, og sostatt kundi verið nýtt meira enn hon verður í dag, av tí at her er nakað ábart og veðurhart.

Tað er tó týdningarmikið, at ein tílík ætlan fær serstakliga varliga býarskipanarliga viðgerð í samráð við eitt nú fornfriðingarmyndugleikar og náttúrufriðingarmyndugleikar, umframt at hetta fer í eina tilgongd við almennari hoyring.

**Heildarætlanin fyri Eystara havnaøki**

Ein útbygging av Skansabryggjuni norðureftir er ikki partur av heildarætlanini fyri Eystara havnaøki, sum varð samtykt í býráðnum 24. februar 2022.

Í teirri politisku viðgerðini av heildarætlanini hava viðmerkingar tó verið um, at ein til- og frákoyringarvegur uttan um Skansan út á ídnaðarøkið á nýggju keiini hevði lætt nógv um ferðslutrýstið ígjøgnum økið.

Sí Samtyktur Bóklingur_Heildarætlan fyri Eystara havnaøki_februar2022_full_res, *j. nr. 22/00638-8*

**Ferðsluteljingar í Eystara havnaøki**
Tað er viðkomandi at nevna í hesum samanhangi, at ferðsluteljingar vórðu gjørdar millum 16. - 22. aug. 2021 á høvuðsvegunum í Eystara havnaøki. Í hesum sambandi hevur tað serligan týdning at upplýsa, at miðalferðslan undir Skansanum út á ídnaðarøkið taldi 1.019 akfør um dagin. Hetta er eitt miðaltal, har bert gerandisdagarnir eru taldir við. Tá vikuskiftið eisini er talt við, eru í miðal 856 akfør um dagin.

Um bert tunga ferðslan er tald, eru 61 tung akfør í miðal gerandisdagar, og 51 tung akfør í miðal um dagin um vikuskiftið eisini er talt við.

Leggjast skal afturat, at hesar ferðsluteljingar taka ikki atlit til, nær mest ferðsla er í økinum, eitt nú tá Norrøna og onnur skip leggja at.
Her eigur tískil ein nýggj teljing at gerast, ið tekur hædd fyri hesum.

Sí viðheft skjøl við ferðsluteljingum út á ídnaðarøkið á keiini:

Ferðsluteljingar í Eystara havnaøki, *j. nr. 22/00638-7*
Nr. 4 osa.rapkoe_pkg - 2021-08-25T131029.045, j.nr. 22/00638-5
Nr. 4 Lastbilar osa.rapkoe_pkg - 2021-08-25T132340.983, j. nr. 22/00638-6

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til, at beina málið aftur í havnanevndina, og at býarskipanardeildin verður tikin við í tilgongdina, tá neyðug loyvir og verkætlanin eru nærri nágreinað.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 04. apríl 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Tekniska nevnd 04. apríl 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Á íløguætlanini hjá Tórshavnar havn fyri 2023 er avsett 1,0 mió kr til verkætanina «Skansabryggjan – útbygging norðureftir».

**Tilmæli**
Virkandi havnarmeistari mælir til at játta 1,0 mió kr. til fyrireikingar og projektering av verkætlanini «Skansabryggjan – útbygging norðureftir», fíggjað av íløgum hjá Tórshavnar havn fyri 2023, og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Havnanevndin 13. juni 2023:** Ein meiriluti, Kári Johansen, Tróndur Sigurðsson og Birgir Nielsen, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Elsa Berg, tók ikki undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 14. juni 2023:** Tikið av skrá.

**Fíggjarnevndin 20. september 2023:** Málið beint aftur í havnanevndina.

**Tilmæli**
Stjórin í Tórshavnar havn vísir til tilmælið í havnanevndini 13. juni 2023.

**Havnanevndin 03. oktober 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 18. oktober 2023:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein og Bjørg Dam, taka undir við havnanevndini og beina málið í býráðið.

Ein minniluti, Annika Olsen og Jákup Dam, atkvøður blankt.

**Býráðsfundur 26. oktober 2023:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við átta atkvøðum fyri, fýra atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jóan Petur Eyðfinnur Johannsen, Birita Baldvinsdótir, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam og Birgir Nielsen.

Ímóti atkvøddu: Jón Kragesteen, Jákup Dam, Gunvør Balle og Annika Olsen.

**Ískoyti:**
LBF hevur gjørt myndugleikaprojekt og kostnaðarmeting (J.nr. 22/00638-20).

**Tilmæli:**
Kunnað verður um málið.

**Havnanevndin 04. juni 2024:** Kunnað var um málið.

**Ískoyti**
Fyrireikingararbeiðið, ið fevndi um at gera dagført myndugleikaprojekt kostnaðarmeting, er liðugt og hevur kostað 395 tkr. Eftir av løgujáttanini P43 «Skansabryggjan – útbygging norður» er eitt avlop á 605 tkr.

**Tilmæli:**
Stjórin í Tórshavnar havn mælir til at loka verkætlanina og flyta avlopið á tkr 605 aftur á løgukarmin hjá Tórshavnar havn, og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Havnanevndin 29. oktober 2024:** Samtykt at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 06. november 2024:** Samtykt at taka undir við havnanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. november 2024:** Einmælt samtykt.

# 292/24 Bátahylurin í Álakeri - keyp av aldubrótara

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Havnanevndin | 07.02.2023 | 3/23 | 23/00611-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 15.02.2023 | 53/23 | 23/00611-1 |
| 3 Býráðsfundur | 23.02.2023 | 52/23 | 23/00611-1 |
| 4 Havnanevndin | 29.10.2024 | 35/24 | 23/00611-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 06.11.2024 | 273/24 | 23/00611-1 |
| 6 Býráðsfundur | 28.11.2024 | 292/24 | 23/00611-1 |

**Upprunin til málið**

**Lýsing av málinum**
Tá ið bátahylurin í Álakeri bleiv prosjekteraður, vórðu tekningar sendar til DHI fyri at gera simuleringar av, hvussu vindur o.a fór at ávirka kyrruna inni í bátahylinum. Talan var um sama simuleringsprogramm, sum var brúkt til Skansabryggjuna. Hetta var eisini fyri at vita, hvørja ávirkan grótkastið í Álakeri kom at fáa á havnarlagið annars.
Niðurstøðan var, at tað kundi verða eitt sindur ófriðarligt í innsiglingini og beint innanfyri, serliga tá ið áhaldandi vindur er av landsynningi.
Annars vísti simuleringin, at kyrran í bátahylinum skuldi verða eins góð og miðal kyrran er við bátaplássini á Skálatrøð, og at brimgarðurin ikki kom at hava neiliga ávirkan á havnarlagið annars.

Nú tá ið flótibrúgvarnar eru lagdar út, vísir tað seg, at kyrran í ávísum økjum inni í bátahylinum ikki samsvarar heilt við kanningarnar. Tá liggjandi vindur er av landsynningi, kemur aldan fram við grótkastinum, og sleppur inn í hylin, og ávirkar mest økið millum flótibrúgv nummar 3 og 4.
Hetta viðførir, at tað verður ov ókyrt á einum strekki millum flótibrúgv 3 og 4, sum ávírkar umleið 50 bátapláss somikið nógv, at fleiri teirra eru rýmdir undan veðrinum, og vilja ikki leggja seg har aftur.

Eftir at hava umrøtt málið, metir umsitingin hjá Tórshavnar havn, at ein aldubrótari í framhaldi av brimgarðinum kann verða ein háttur at minka um hendan trupulleika.
Upprunaliga simuleringin fyri bátahylin í Álakeri vísti, at kyrran økist við longdini á brimgarðinum. Ein aldubrótari í framhaldi av brimgarðinum fer tí mest sannlíkt eisini at økja um kyrruna, hóast tað ikki kann sigast við vissu, hvussu væl loysnin við aldubrótara kemur at roynast.

Tórshavnar havn hevur aldubrótarar liggjandi Úti í Bakka, í Kaldbaksbotni og við Sjógv í Kollafirði, og felags fyri hesar er, at teir hava virka sera væl.

Tá aldubrótarin er lagdur út, verður innsiglingin til bátahylin góðar 20 m breið í mun til um 45 m í dag.

Ein 22 x 4 metur aldubrótari við útlegging, ljós o.a, kostar umleið 1,3 mió kr, (J.Nr. 23/00611-3).

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**
Ein 22 x 4 metur aldubrótari við útlegging, ljós o.a, kostar umleið 1,3 mió kr.
Á íløgukarminum LK74999 "Smábátahavnir" eru í 2023 avsettur 3,5 mió.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Virkandi havnameistarin mælir til at keypa umrødda aldubrótara og at játtaðar verða kr. 1,0 mió av íløgum fyri 2023 (LK74999 "Smábátahavnir"), at írestandi kostnaðurin umleið 0,3 mió, verður fíggjaður av rakstri, og at málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Havnanevndin 07. februar 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og biðja um tilboð frá minst trimum veitarum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 15. februar 2023:** Samtykt at taka undir við havnanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. februar 2023:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Aldubrótarin er keyptur og lagdur út, og royndirnar higartil hava verið góðar, bæði frá aldu av landsynningi og aldum frá skipum, sum sigla framvið. Verkætlanin kann tískil lokast. Bókaðar eru kr. 995.404 kr á verkætlan L74015 «Aldubrótari til bátahylin í Álakeri», og er avlopið sostatt kr. 4.596.

**Tilmæli**
Stjórin í Tórshavnar havn mælir til, at loka verkætlan L74015 «Aldubrótari til bátahylin í Álakeri»; at avlopið verður flutt aftur á løgukarmin fyri smábátahavnir LK74999; og at málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Havnanevndin 29. oktober 2024:** Samtykt at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 06. november 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>28. november 2024 | Blað nr.: 1213 |
| | | Formansins merki: |

**Býráðsfundur 28. november 2024:** Einmælt samtykt.

# 293/24 SSL : Fyrispurningur um tillaging av ferjuleguni í Hesti til Erlu Kongsdóttir

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Havnanevndin | 15.05.2023 | 16/23 | 23/02476-3 |
| 2 Fíggjarnevndin | 17.05.2023 | 143/23 | 23/02476-3 |
| 3 Havnanevndin | 07.02.2024 | 5/24 | 23/02476-3 |
| 4 Havnanevndin | 29.10.2024 | 36/24 | 23/02476-3 |
| 5 Fíggjarnevndin | 06.11.2024 | 274/24 | 23/02476-3 |
| 6 Býráðsfundur | 28.11.2024 | 293/24 | 23/02476-3 |

**Upprunin til málið**
Fundur í Samferðslumálaráðnum 10/3 viðv. atløguviðurskifunum í Hest og teldupostur frá SSL um sama, dagf 31-03-2023.

**Lýsing av málinum**
Samferðslumálaráðið og SSL hava boðað frá, at tá ið Teistin gevst at sigla um Skopunarfjørð, fer Erla Kongsdóttir at røkja siglingina út í Hest.

SSL skrivar soleiðis í telduposti:

*"Hjálagt er uppskot til atløguloysn í Hesti og er kostnaðarmeting fyri framleiðslu av rampu, sum mett verður neyðug til atløguna í Hesti, so bæði Erla Kongsdóttir og størri skip kunnu avskipa vanlig og tung akfør.*

*Kostnaðarmetingin er 1,2 mió.kr og er grundað á framleiðslu av hydrauliskari ella el-spinnil bilrampu við hesi 5,0/3,0 metur breidd og 8 metur longd. Berievnið, tá rampan hvílir niður á atløgu, er aksiltrýst á 12 tons.*

*Berievnið í lyft er 13 tons og slaglongd 2,5 metur (lyftir annaðhvørt vertikalt ella sum saksalyft og læsing av rampu er við at brúka hydraulisk stempul/el-spinnil. Framleitt verður eisini 'skirt' til at tryggja at EK kann leggja inn ímóti rampu, tá ið flóð er. Sí annars hjáløgdu skjøl.*

*Kostnaðurin fyri sjálvt arbeiðið úti í Hesti er ikki íroknaður. Tað er t.d betongarbeiðið, montering av rampu og at festa hydrauliksylindarar/el-spinnil og el-arbeiðið.*

*Lat okkum frætta, hvussu ið farið verður víðari fram, so vit tryggja, at atløgurnar hjá Erlu Kongsdóttir eru klárar og tryggar, tá ið hon skal byrja siglingina í seinasta lagil, tá ið Teistin gevst at sigla um Skopunarfjørð.*

*Aftrat atløguni í Hesti má hydrauliska rampan á Gomlurætt tryggjast – tvs læsingar gerast - so Erla Kongsdóttir trygt kann brúka hana til ferðafólka- og akfarsflutning. SSL hevur útvegað tekningar og kostnaðarmeting frá Mest til hetta arbeiðið, og fer skjótast gjørligt at senda hesar til Landsverk og Fiski- og Samferðslumálaráðið.*

*Fyri at tryggja, at partarnir vita hvør av øðrum, seta vit tá TH/TK á Cc. Tí tað er alneyðugt, at báðar atløgurnar eru tillagaðar til ferðafólka- og akfarsflutning við EK."*

<u>Viðmerkingar frá Tórshavnar havn:</u>

Av tí at bildekkið á Erlu Kongsdóttir er væl hægri enn á øðrum bilferjum hjá SSL, og at rampan/portrið framman á Erlu Kongsdóttir er so stutt, umframt at stórur munur er á flóð og fjøru, ber ikki til at nýta verandi atøgurampu í Hesti til at avskipa akfør í/úr Erlu Kongsdóttir.

Í Tórshavn og í Nólsoy bleiv trupulleikin við høga bildekkinum og stuttu rampuni á Erlu Kongsdóttir loystur við at stoypa eina serliga betongrampu omaná bryggjukantin, men hendan loysnin ber ikki til at fremja í Hesti vegna stóra munin á flóð og fjøru.

SSL hevur upp á fyrispurning sagt frá, at SSL hevur ikki játtan til sjálvt at gera omanfyrinevndu broytingar á atløguna í Hesti.

Tórshavnar havn eigur havnina í Hesti, og Føroya Landsstýrið eigur havnina á Gomlurætt. Tað er tí helst rættast, at Tórshavnar havn ger og rindar fyri neyðugar umbyggingarnar á atløguna í Hesti, soleiðis at ognarviðurskiftini eru greið.

Tórshavnar havn hevur biðið SSL um kostnaðarmeting av montering og íverksetan av rampuni, soleiðis at samlaði kostnaðurin er kendur, men hetta er ikki móttikið í skrivandi stund.

Harumframt hevur Tórshavnar havn biðið um eina frágreiðing um, hvørt loysnin við hesi rampu til Erlu Kongsdóttir er ein varandi loysn fyri siglingina út í Hest, ella um tað kann hugsast, at eitt annað skip verður sett inn um fá ár, soleiðis at hendan rampan tá má takast burturaftur, men hendan frágreiðingin er ikki móttikin í skrivandi stund.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
J.nr. 23/02476-1 : Tekningar og kostnaðarmeting frá MEST av atløgurampu í Hesti.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei
**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | Játtast á: |
|---|---|

| Býráðsfundur<br>28. november 2024 | Blað nr.: 1216 |
|---|---|
| | Formansins merki: |

| Deild | Verk-ætlan | Navn |
|---|---|---|
| | | Landstreymur |

| Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan |
|---|---|---|---|
| | | | Atløgan í Hesti |

| Upphædd |
|---|
| |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Málið verður lagt fyri havnanevndina til umrøðu.

**Havnanevndin 15. mai 2023:** Málið varð umrøtt.

**Fíggjarnevndin 17. mai 2023:** Umrøtt.

**Ískoyti:**

SSL hevur hin 22-05-2023 sent teldupost við nærri frágreiðing um hvørt talan er um eina varandi loysn við hesari rampuni. Í frágreiðingini verður sagt, at SSL hevur einki annað skip enn Erlu Kongsdóttir at seta inn á Hestleiðini, so í so máta er talan um eina varandi loysn. Tilmælið viðv. rampuni, ið SSL saman við Mest hevur sent Tórshavnar Havn, byggir á ein leist, har ið atløgan verður gjørd klár til í roynd og veru øll skipasløg, ið SSL hevur. T.v.s., bæði Ternuna og Erlu K og eisini Sam, um tað skuldi komið hartil, at tað verður neyðugt onkran túr í.s.v. t.d. tungan farm. Teistin kemur helst ikki at brúka hesa rampuna so nógv, eftirsum upplatingin av Sandoyartunnlinum nærkast, men alt eftir, hvussu skjótt, ið rampan verður gjørd, so kann Teistin nokk eisini koma at brúka nýggju rampuna. SSL sær eisini hesa rampuna sum eina møguliga fyrimynd fyri, hvussu ið rampan eisini kann betrast úti í Nólsoy og í Havnini.

Tórshavnar havn hevur í heyst saman við SSL, MEST og LBF arbeitt við at tillaga uppskotið hjá MEST til bilrampu, soleiðis at best møguliga loysnin kann finnast. Tað er tó greitt, at tað ikki ber til at gera eina optimala loysn á atløguviðurskiftunum í Hesti, sum hóskar bæði til Erlu Kongsdóttir og aðrar bilferjur (Teistan, Ternuna og Sam). Orsøkirnar eru: 1) at tað í Hesti er stórur munur á flóð og fjøru (+/-1,3 m, og í ekstremum førur +/- 1,5-1,7 m), og 2) Erla Kongsdóttir hevur óvanliga stóra dekkshædd og stutta rampu í mun til aðrar bilferjur hjá SSL. Tískil verður ikki talan um eina optimala loysn, men um frægast møguliga kompromis, har ið atløguviðurskiftini fyri Erlu Kongsdóttir verða so fræg sum til ber, meðan atløguviðurskiftini fyri aðrar bilferjur í ávísum førum verða nakað verri enn verandi viðurskifti, men tó nýtilig í flestu førum.

Útfrá hesum hevur MEST givið Tórshavnar havn tilboð, dagfest 15. november 2023, J.nr. 23/02476-17, upp á hydrauliska bilrampu við hesum spesifikatiónum:

- Breidd 6 m, longd 13m + 4,4m yvirgangsrampa

- Gjørd úr galvanliseraður stáli, við galvaniseraðari koyririst og gelendarum
- Kann stillast í hædd og læsast
- Berievni tá ið rampan hvílir á betongrampu: 12 tons aksiltrýst, 25 tons «vogntog».
- Berievni í lyft: 10 tons

Tilboðið er áljóðandi kr 3.209.000,- u/mvg.

Aftrat tilboðnum koma útreiðslur til ein skúr til tøkni (el og hydraulik), lendisarbeiði (fesitr og leiðingar) umframt ráðgeving og óvæntað, í alt mett til uml. 800.000,-.

Tórshavnar havn hevur heitt á LBF um at granska rampuloysnina hjá MEST, og hevur LBF latið Tórshavnar havn notat dagfest 10. januar 2024, J.nr. 23/02476-20.

LBF vísir m.a. á, at verandi betongrampa í Hesti riggar ikki til Erlu Kongsdóttir, tí dekkshæddin á EK er 0,4m hægri enn á Teistanum. Uppskotið til nýggja rampu er hydrauliskt, soleiðis at rampan kann lyftast upp og niður og harvið lagast til dekkshæddina á EK, so hon riggar væl á vanligum vatnstøðum. Nýggja rampan er longri enn verandi rampa og tí kann longdarhallið verða slakari í fleiri støðum, t.v.s. at tað verður ikki so bratt at fara um rampuna á miðalvatni og flóð. Støðan við nýggju rampuni og EK verður tískil lík støðuni við Teistanum og verandi rampu.
Hinvegin verður hydrauliska rampan í ávísum førum ov brøtt, serliga á lágari fjøru. Tá verður longdarhallið omanfyri 20% og lýkur ikki krøvini í ISO standardinum. Eisini verða broytingar í longdarhallinum, ávíkavist millum rampu og bryggju, og millum rampu og skip, ov stórar í mun til ISO standardin, serliga tá høg og lág vatnsstøða er. Hesi viðurskifitini gera, at tað á lágari fjøru verður ov bratt hjá vanligum akførum at koma umborð og í land, og størri akfør fara at taka í dekkið/rampuna. Rampan verður eisini ov brøtt til fótgangarar, serliga tá høg og lág vatnstøða er, tí flestu búfólkini eru eldri og illa gongd.
LBF vísir á, at um ein skjótirampa verður gjørd á Erlu Kongsdóttir, ið kann økja longdina á skipsrampuni úr 2 upp í 4 m, kann tað avmarka vansarnar við ov stórum longdarhalli, soleiðis at viðurskiftini gerast tryggari bæði fyri ferðafólk og bilar.
Av tí at nýggja stálrampan verður løgd oman á verandi betongskráa, økist hæddin upp á skráan við meiri enn 0,3 m. Hetta viðførir, at nýggja rampan verður illa nýtilig hjá SAM, meðan møguleikarnar við Teistanum og Ternuni verða samsvarandi skerdir á lágari fjøru. LBF metir tí, at við hesu rampu verður Teistin einasta SSL-ferja, sum er skikkað sum avloysaraskip til Hestleiðina.

Samanumtikið kann sigast, at uppskotið til nýggja hydrauliska rampu, er frægasta loysnin, ið til ber at gera við verandi umstøðum, uttan at verandi betongrampa verður tikin burtur og heilt nýggj ferjulega verður gjørd. Tílík loysn verður munandi meiri kostnaðarmikil enn hetta uppskotið.

SSL hevur í tíðindaskrivi 20.desember 2023 boðað frá, at Erla Kongsdóttir væntandi byrjar at røkja hestleiðina í apríl mánað, eftir at eitt brek á girinum er umvælt.
Sostatt er nú greitt, at um Erla Kongsdóttir skal kunna flyta bilar til og úr Hesti, er neyðugt við eini bilrampu í Hesti.

Tað er einki avsett á íløguætlanini hjá Tórshavnar havn til hetta endamálið. Tískil er neyðugt at finna fíggingina innanfyri onkra aðra verkætlan á íløguætlanini.

**Skjøl:**
J.nr. 23/02476-17 : MEST tilboð : Bilrampa til ferjuleguna í Hesti – 2023 REV B
J.nr. 23/02476-20 : LBF – Bilrampa í Hesti – Skriv og tekningar

**Tilmæli:**
Treytað av, at ein nøktandi avtala um gjald fyri nýtslu av rampuni í Hesti fæst við SSL, mælir stjórin í Tórshavnar havn til,

- at taka av tilboðnum frá MEST áljóðandi kr 3.209.000 upp á bilrampu til ferjuleguna í Hesti.

- at játta 4,0 mió til verkætlanina P46 «Atløgan í Hesti», at fíggja av íløgum hjá Tórshavnar havn, og sum verða fluttar frá verkætlanini P42 «Havnarøkið á Oyrareingjum», har ið avsettar eru kr. 8.000.000 á fíggjarætlanini.
- at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.
  At Tórshanvar havn heitir á SSL um samstundis at leingja skipsrampuna á Erlu Kongsdóttir úr 2m upp í 4m, soleiðis sum LBF mælir til.

**Havnanevndin 07. februar 2024:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Erla Kongsdóttir byrjaði at sigla upp á Hest umleið ½ juli í ár.

Tórshavnar havn gjørdi í tí sambandinum eina sama slag betongrampu í Hesti, sum rampurnar til Erlu Kongsdóttir í Tórshavn og í Nólsoy.

Arbeiðið varð boðið út til 2 arbeiðstakarar sum undirhondsboð og hevði J&K Petersen lægsta boð á kr. 194.397. Endaligi kostnaðurin gjørdist umleið kr. 207.955.

**Tilmæli**
Stjórin í Tórshavnar havn mælir til
- at játta kr. 208.000 av íløgukarminum hjá Tórshavnar havn fyri 2024 til arbeiðið.
- at verkætlanin verður lokað.
  at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Havnanevndin 29. oktober 2024:** Samtykt at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 06. november 2024:** Samtykt at taka undir við havnanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. november 2024:** Einmælt samtykt.

# 294/24 Verjugarður við Vónina - broyting

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Havnanevndin | 07.02.2024 | 8/24 | 24/00634-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 21.02.2024 | 34/24 | 24/00634-1 |
| 3 Býráðsfundur | 29.02.2024 | 43/24 | 24/00634-1 |
| 4 Havnanevndin | 29.10.2024 | 37/24 | 24/00634-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 06.11.2024 | 275/24 | 24/00634-1 |
| 6 Býráðsfundur | 28.11.2024 | 294/24 | 24/00634-1 |

**Upprunin til málið**
Eftir áheitan frá Rescue Lív, hevur havnanevndarformaðurin biðið um at fáa málið á skrá.

**Lýsing av málinum**
Rescue Lív hevur gjørt vart við, at tað er heldur trongligt at sigla inn/út úr teirra atløguplássi í bátahylinum í Álakeri. Frástøðan frá horninum á verjugarðinum við Vónina og til armarnar á nærmastu bátabrúnni er sambært Rescue Lív heldur lítil og tí eru teir ótryggir at sigla út og inn.

Tórshavnar havn hevur gjørt projektuppskot um at taka burtur hornið á verjugarðinum, og hevur biðið um undirhondsboð uppá arbeiðið. Sp/f Andrias Berg hevði lægsta boð áljóðandi 366.000 kr.
Umframt tilboðsupphæddina má nakað setast av til ókendar útreiðslur og møguligar nøgdarreguleringar, í hesum føri mett til kr. 134.000.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/læ ttar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Stjórin í Tórshavnar havn mælir til:

- At taka av tilboðnum frá Sp/f Andrias Berg áljóðandi kr 366.000.
- At játta kr. 500.000 av íløgukarminum fyri 2024 til smábátahavnir.
- At beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Havnanevndin 07. februar 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 21. februar 2024:** Samtykt at taka undir við havnanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 29. februar 2024:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Arbeiðið við at broyta verjugarðin við Vónina er liðugt og kann verkætlanin sostatt lokast. Endaligi kostnaðurin gjørdist kr. 395.710. Á løgujáttanini L74016 er eitt avlop á kr. 104.290 kr.

**Tilmæli:**
Stjórin í Tórshavnar havn mælir til, at verkætlanin L74016 «Verjugarður við Vónina» verður lokað; at avlopið á tkr 104 verður flutt aftur á løgukarmin fyri smábátahavnir LK 74999; og at málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Havnanevndin 29. oktober 2024:** Samtykt at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 06. november 2024:** Samtykt at taka undir við havnanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. november 2024:** Einmælt samtykt.

# 295/24 Bíðirúm í Hesti

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Havnanevndin | 18.03.2024 | 13/24 | 24/01596-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 17.04.2024 | 99/24 | 24/01596-1 |
| 3 Býráðsfundur | 24.04.2024 | 104/24 | 24/01596-1 |
| 4 Havnanevndin | 29.10.2024 | 38/24 | 24/01596-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 06.11.2024 | 276/24 | 24/01596-1 |
| 6 Býráðsfundur | 28.11.2024 | 295/24 | 24/01596-1 |

**Upprunin til málið**
Havnanevndarformaðurin hevur biðið um at fáa málið á skrá.

**Lýsing av málinum**
Ynski er um, at fáa eitt bíðirúm í Hesti til ferðafólk, ið skulu við ferjunum hjá SSL.
Eisini kunnu útlendingar (og føroyingar), ið koma út í Hest við seglbátum og øðrum frítíðarbátum, nýta bíðirúmið at sita í.
Tórshavnar havn hevur umbiðið tilboð upp á eitt bíðirúm, ið er sett saman av tveimum 20’ bingjum.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
J.nr. 24/01596-2 : Tekning av bíðirúmi.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/léttar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:** Stjórin í Tórshavnar havn mælir at játta 500.000 kr. av íløguætlanini fyri bátahavnir fyri 2024 og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Havnanevndin 18. mars 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 17. apríl 2024:** Samtykt at taka undir við havnanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. apríl 2024:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Bíðiskúrur er nú uppsettur í Hesti og verkætlanin kann lokast. Samlaði kostnaðurin av verkætlanini L74017 «Bíðirúm í Hesti» er kr. 576.437, meðan játtanin er kr. 500.000. Sostatt kann staðfestast ein meirnýtsla á kr. 76.427.

**Tilmæli**
Stjórin í Tórsavnar havn mælir til, at játtaðar verða kr 77.000 av løgukarminum fyri smábátahavnir LK74999 til verkætlanin L74017 «Bíðirúm í Hesti»; at verkætlanin verður lokað; og at málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Havnanevndin 29. oktober 2024:** Samtykt at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 06. november 2024:** Samtykt at taka undir við havnanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. november 2024:** Einmælt samtykt.

## 296/24 Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2024

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 21.02.2024 | 47/24 | 24/00061-1 |
| 2 Býráðsfundur | 29.02.2024 | 46/24 | 24/00061-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 20.03.2024 | 79/24 | 24/00061-1 |
| 4 Býráðsfundur | 21.03.2024 | 69/24 | 24/00061-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 17.04.2024 | 103/24 | 24/00061-1 |
| 6 Býráðsfundur | 24.04.2024 | 107/24 | 24/00061-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 22.05.2024 | 145/24 | 24/00061-1 |
| 8 Býráðsfundur | 30.05.2024 | 139/24 | 24/00061-1 |
| 9 Fíggjarnevndin | 20.06.2024 | 191/24 | 24/00061-1 |
| 10 Býráðsfundur | 20.06.2024 | 179/24 | 24/00061-1 |
| 11 Fíggjarnevndin | 19.09.2024 | 231/24 | 24/00061-1 |
| 12 Býráðsfundur | 19.09.2024 | 231/24 | 24/00061-1 |
| 13 Fíggjarnevndin | 23.10.2024 | 266/24 | 24/00061-1 |
| 14 Býráðsfundur | 24.10.2024 | 263/24 | 24/00061-1 |
| 15 Fíggjarnevndin | 27.11.2024 | 282/24 | 24/00061-1 |
| 16 Býráðsfundur | 28.11.2024 | 296/24 | 24/00061-1 |

**Upprunin til málið**
Sambært kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununnar o.t. §10 skulu kommunur innraportera roknskapardátur hvønn mánað til Fíggjarmálaráðið.

Sambært § 9 skal kommunustýrið góðkenna.

**Lýsing av málinum**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

| | **Býráðsfundur**<br>28. november 2024 | Blað nr.: 1224 |
|---|---|---|
| | | Formansins merki: |

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Roknskapurin fyri januar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 21. februar 2024:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 29. februar 2024:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri februar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 20. mars 2024:** Framlagt.

**Býráðsfundur 21. mars 2024:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri mars verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 17. apríl 2024:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 24. apríl 2024:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri apríl verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 22. mai 2024:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 30. mai 2024:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri mai verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2024:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 20. juni 2024:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri juni, juli og august verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 19. september 2024:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 19. september 2024:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri september verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 23. oktober 2024:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 24. oktober 2024:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri oktober verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 27. november 2024:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 28. november 2024:** Einmælt samtykt.

## 297/24 Stórhøll

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 28.09.2021 | 238/21 | 21/03920-1 |
| 2 Býráðsfundur | 30.09.2021 | 222/21 | 21/03920-1 |
| 3 Mentamálanevndin | | | 21/03920-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 15.06.2022 | 154/22 | 21/03920-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 22.06.2022 | 188/22 | 21/03920-1 |
| 6 Býráðsfundur | 22.06.2022 | 142/22 | 21/03920-1 |
| 7 Býráðsfundur | 28.11.2024 | 297/24 | 21/03920-1 |

**Upprunin til málið**
Tórshavnar kommuna saman við handils- og vinnulívi vilja taka stig til at byggja altjóða stórhøll.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Endamál við stórhøllini er at skapa bestu karmar til stór føroysk og altjóða tiltøk innan ítrótt, mentan, ráðstevnur, keypsstevnur, samkomumøtir v.m., umframt at vera karmur sum ítróttahøll til flestu innandura ítróttagreinir.

Kommunan hevur havt ætlan um stórhøll í høvuðsstaðnum í fleiri ár, og kommunan hevur áður sett sett fígging á íløgujáttanina til fyrireikingar.

Í eina tíð hevur samskifti verið við partar úr handils- og vinnulívinum við tí endamáli saman at fáa bygt eina stórhøll, sum mett verður Føroyar hava stóran tørv á. Í uppskoti er at byggja stórhøll við eini brutto gólvvídd uppá 8.350 m2 og planerað lendi uppá 23.000 m2, harímillum 650 parkeringspláss. Kostnaðarmeting er kr. 217,8 mió u/mvg.

Stórhøllin er ætlað eisini at verða partur av føroysku tilbúgvingini við egnari streym- og hitaveiting; høllin kann herberga stórari mannfjøld, skuldi kreppustøða gjørt tað neyðugt.

Sjálv stórhøllin kann skipast alt eftir tiltøkunum. Til ein hondbóltsdyst kunnu vera eini 2.700 áskoðarar, og til eina konsert, har áskoðararnir standa, kunnu vera 4.600. Sita áskoðararnir, er pláss fyri uml. 3.600. Aftrat høllini eru umklæðingarrúm, fundarhøli, veitingarrúm, goymsla v.m.

Mett verður, at byggitíðin er 20 mðr.

Sambært ætlanini skal sjálvsognarfelag standa fyri byggingini og eiga stórhøllina, og rakstrarfelag skal standa fyri dagliga rakstrinum av høllini. Hesi feløg eru ikki stovnað enn.

Í uppskoti er, at Tórshavnar kommuna ber 50% av samlaða byggikostnaðinum, meðan restfíggingin skal koma frá stuðli frá fyritøkum og úr ymsum grunnum heima og uttanlands. Við støði í kostnaðarmetingini er kommununnar lutur at fíggja kr. 108,9 mió u/mvg.

Kommuna kann sambært kommunustýrislógini grein 50 einans taka lut í vinnuligum virksemi, um so er, at virksemið tænir einum almannagagnligum endamáli og ikki hevur vinning fyri eyga. Eisini er ásett, at kommuna kann seta almenn tiltøk í verk, um so er, at hetta er til frama fyri vinnulívið á staðnum, men stuðul til einstaklingar ella einstakt virki má ikki latast uttan so, at serligar orsøkir eru.

Stórhøllin sum karmur hevur í sær mangar møguleikar bæði av almannagagnligum og vinnuligum slag, sum ikki eru til í Føroyum frammanundan, men sum stórur tørvur er á serliga innan ávísar ítróttagreinir og events.

Tórshavnar kommununa hevur harumframt sum mál at gera Tórshavn til altjóða ráðstevnubý, sum handils- og vinnulívið og stovnar annars fyriskipa, og sum er við til at stuðla undir menningina av ferðavinnuni og tænastuvinnuni í kommununi.

Leikluturin hjá kommununi at fíggja part av bygginini, so at stórhøll í høvuðsstaðarøkinum kann realiserast, er fyrst og fremst tann at fáa til vega serstakar karmar til almannagagnlig endamál innan ítrótt, mentan og almennar upplivingar annars, umframt at handils- og vinnulívið eins væl og tað almenna kann fáa atgongd til nútímans høli og hentleikar, sum kunnu draga til býin og landið stór tiltøk. Ein stórhøll skapar nýggjar forteytir fyri samfelagsmenningini eisini í kappingini við okkara grannalond.

Til tess at seta sjøtul á verkætlanini er neyðugt, at kommunan gevur tilsøgn um hennara part av fíggingini soleiðis, at fyrireikingararbeiðið kann gerast meira ítøkiligt, harundir eisini at fáa til vega alla fíggingina, og at skipa formligu viðurskiftini viðvíkjandi bygging, lendisútvegan, ognarviðurskifti v.m.

Kommunan eigur at seta sum treyt fyri tilsøgn um fígging, at játtanin verður ikki goldin uttan so, at kommunan eins væl og sjálvsognarfelagið undir stovnan hava fingið øll myndugleikaloyvi til vega, og at játtan er sett av á fíggjarætlanini.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og trivnaðarstjórin mæla býráðnum til at taka støðu til, um kommunan skal veita sjálvsognarfelagnum undir stovnan tilsøgn uppá 50% ella í mesta lagi kr. 108,9 mió í fígging til byggingina av stórhøllini treytað av, at øll loyvi fyriliggja, og um játtað, at seta neyðugu fíggingina til vega í fíggjarætlanini.

**Fíggjarnevndin 28. september 2021:** Annika Olsen og Elsa Berg seta fram soljóðandi broytingaruppskot: Tórshavnar kommuna fer undir arbeiðið at byggja eina stórhøll í samráð við ítróttarfeløg í kommununi og privatum aktørum. Kommunan stuðlar bygginini við at lata lendi og gera lendisarbeiðið. Fíggingin til hallarbyggingina skal fáast til vega frá privatum aktørum. Setast skal sum treyt, at kommunan yvirtekur ognarrættin og raksturin av høllini, tá høllin er liðug.

Fyrst varð atkvøtt um broytingaruppskotið frá Anniku Olsen og Elsu Berg, ið fall við tveimum atkvøðum fyri og trimum ímóti.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen og Elsa Berg.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein og Tróndur Sigurðsson.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið frá kommunustjóranum og trivnaðarstjóranum, og samtykti ein meiriluti, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðson og Annfinn Brekkstein, at kommunan veitir sjálvsognarfelagnum undir stovnan tilsøgn uppá 50% av samlaða kostnaðinum ella í mesta lagi kr. 108,9 mió í fígging til byggingina av stórhøllini treytað av, at øll loyvi fyriliggja og at sjálvsognarfelagið sjálvt útvegar restina av fíggingini. Fíggingin verður at seta á fíggjarætlanina, tá ið verkætlanin fer í gongd.

Annika Olsen og Elsa Berg atkvøddu blankt.

Málið beint í býráðið.

**Býráðsfundur 30. september 2021:** Fyrst varð atkvøtt um uppskot frá Gunvør Balle um at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina og mentamálanevndina, ið fall við fimm atkvøðum fyri, sjey ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Jón Kragesteen, Gunvør Balle, Annika Olsen og Ruth Vang.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk og Bjørg Dam.

Blankt atkvøddi: Birgir Nielsen.

Síðani varð atkvøtt um soljóðandi broytingaruppskot frá Anniku Olsen:

Tórshavnar kommuna fer undir arbeiðið at byggja eina stórhøll í samráð við ítróttarfeløg í kommununi og privatum aktørum. Kommunan stuðlar byggingini við at lata lendi og gera lendisarbeiðið. Fíggingin til hallarbyggingina skal fáast til vega frá privatum aktørum. Setast skal sum treyt, at kommunan yvirtekur ognarrættin og raksturin av høllini, tá høllin er liðug. Og at heita á landið um at vera við í fíggingini.

Broytingaruppskotið fall við seks atkvøðum fyri, seks ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkøddu: Elsa Berg, Jón Kragesteen, Gunvør Balle, Annika Olsen, Birgir Nielsen og Ruth Vang.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk og Bjørg Dam.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 9 atkvøðum fyri, fýra blonkum og ongari ímóti.

Fyri atkvødddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Jón Kragesteen og Birgir Nielsen.

Blankt atkvøddu: Elsa Berg, Gunvør Balle, Annika Olsen og Ruth Vang.

**Ískoyti:**
Kunnað verður um málið.

**Fíggjarnevndin 15. juni 2022:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Sambært skrivi frá Føroya Arena er fíggingin uppá kr. 218,9 mió eru fingnar til vega, sum er kr. 1, 1 mió meira enn upprunaliga kostnaðarmetingin at byggja stórhøllina.

Seinastu mánaðirnar eru prísirnir á tilfari, veitingum og flutningi hækkaðir, serliga vegna kríggið í Ukraina. Vísandi til óvissuna, ið valdar á marknaðinum, er ikki møguligt at gera avtalur um tilfar og veitingar við undirveitarar og harvið fastlæsa byggiprísin, fyrr enn endalig avgerð er tikin um, at farið verður undir at byggja stórhøllina.

Gjørd er tí nýggj kostnaðarmeting, ið ljóðar uppá kr. 242 mió sum fastur prísur, tvs. íroknað lønar- og prísvøkstur. Ætlanin er, at kommunan fíggjar hetta soleiðis, at samlaði karmurin er kr. 132 mió.

Sambært fíggjar- og gjaldførisætlanini er ætlaða játtanin hjá kommununi kr. 132 mió býtt yvir 3 ár. Í mun til gjaldførið í byggingini kann vera, at gjald skal framskundast alt eftir, nær hinir stuðlarnir gjalda sín part.

**Trygd**
Sum stovnari veitir Tórshavnar kommuna sjálvsognarstovninum Føroya Arena trygd fyri, at parkeringsøkið verður liðugtgjørt, og at nøktandi tal av parkeringsplássum – herundir felags parkeringsplássum – eru tøk til hentleikarnar í økinum. Trygdin fevnir um skjalprógvaðan prís- og lønarvøkstur í mesta lagi kr. 26 mió sbrt. kostnaðarmeting, j.nr. 21/03920-14.

**Lendið**
Sjálvsognarstovnurin eigur og rekur høllina. Kommunan letur sjálvsognarstovninum lendið undir høllini sum stovnandi fæ og brúksrætt til øki til parkering, sum verður lagt í sjálvstøðugan matrikul.

**Viðtøkur**
Tórshavnar kommuna skal sambært uppskotinum til viðtøkur stovna Føroya Arena, ið er sjálvsognarstovnur, hvørs endamál er at byggja og reka eina stórhøll, ið kann rúma stórum ítróttartiltøkum, messum, mentanartiltøkum av ymsum slag og vera partur av føroysku krepputilbúgvingini, j.nr. 21/03920-17.

Sjálvsognarstovnurin fær heimstað í Tórshavnar kommunu, men stovnarin ella tey, ið hava skotið pening í verkætlanina, hava eingi rættindi í mun til ognirnar hjá stovninum. Sjálvsognarstovnurin er sjálvstøðug løgfrøðilig eind, leysur og óheftur av stovnaranum.

Ein nevnd við fimm limum skal veljast at stýra grunninum. Tórshavnar kommuna velur tveir nevndarlimir, Vinnuhúsið ein, ÍSF ein og Visit Faroe Islands P/f velur ein lim. Limirnir verða valdir fyri tvey ár í senn. Varalimur verður valdur fyri hvønn lim sær.

Til at standa fyri sjálvari byggingini av høllini, velur nevndin eina bygginevnd, ið skal sita, til høllin er liðug og avhendað sjálvsognarstovninum.

**Nevndin**
Heitt er á Vinnuhúsið, ÍSF og Visit Faroe Islands P/f um velja lim í nevndina. Umboð fyri Vinnuhúsið er xx, og sum varalimur xx. Umboð fyri ÍSF er Elin Heðinsdóttir Joensen, ÍSF-forseti og sum varalimur John Kjær. Umboð fyri Visit Faroe Islands P/f er Guðrið Højgaard, stjóri, og sum varalimur Annleyg Lamhauge.

Tórshavnar býráð velur tveir limir í nevndina eftir lutfalsvalháttinum.

**Altjóða krøv til høllina**
Samskift er við Hondbóltsamband Føroya og Flogbóltssamband Føroya um krøv til høllina í sambandi við altjóða dystir, j. nr. 21/03920-10.

Hondbóltssamband Føroya upplýsir við støði í ráðgeving frá norska hondbóltssambandinum, at høll sum henda er góðkend til altjóða dystir. Flogbóltsamband Føroya upplýsir, at høllin verður góðkend til altjóða dystir upp til kategori 3.

Høllin uppfyllir eisini krøvini til sjónvarping.

**Staðseting**
Staðseting av stórhøllini hevur verið viðgjørd sum liður í samlaðu skipanini av Stórutjørn. Tað er mest skynsamt at staðseta ítróttarøkið norðalaga í økinum, soleiðis at ítróttaøkið verður skipað sum eitt samlað økið, sum umframt at hýsa stórhøllini somuleiðis við tíðini kemur at fevna um aðrar ítróttahentleikar, sí skjal 21/03920-15.

Umsitingin hevur saman við Articon og ráðgevunum av heildarætlanini fyri Stórutjørn samstarvað um hetta. Víst verður til viðheftu skitsu, sum sýnir, hvussu stórhøllin verður staðsett í lendið útfrá lendisviðurskiftunum. Harumframt sæst á skitsuni, hvussu aðrir ítróttahentleikar í framtíðini kunnu koma at viðvirka til, at økið verður ein heild, og at hentleikarnir kunnu skapa samvirkanarárin.

**Tilmæli:** Skal stórhøllin byggjast eftir leistinum, ið er lýstur omanfyri, krevst, at Tórshavnar kommuna tekur stig til at stovna sjálvsognarstovnin Føroya Arena. Kommunustjórin og trivnaðarstjórin mæla í hesum sambandi til at, Tórshavnar kommuna:

- Stovnar Føroya Arena sum sjálvsognarstovn

- Samtykkir viðtøkurnar fyri Føroya Arena

- Veitir stuðul áljóðandi kr. 132.000.000,00 til bygging av stórhøllini. Peningurin verður játtaður soleiðis, at kr. 11.000.000,00 verða játtaðar í ár av LK 57038, og restin verður játtað á fíggjarætlanini fyri 2023 og 2024.

- Velur hesi umboð í nevndina fyri Føroya Arena:

Fyri Vinnuhúsið: xx, og sum varalimur xx.

Fyri ÍSF: Elin Heðinsdóttir Joensen, ÍSF-forseti, og sum varalimur John Kjær.

Fyri Visit Faroe Islands P/f: Guðrið Højgaard, stjóri, og sum varalimur Annleyg Lamhauge.

Harumframt tvey umboð og tveir varalimir vegna Tórshavnar kommunu.

- Sum stovnari veitir Føroya Arena trygd fyri, at parkeringsøkið verður liðugtgjørt, og at nøktandi tal av parkeringsplássum – herundir felags parkeringsplássum – eru tøk til hentleikarnar í økinum. Trygdin fevnir um skjalprógvaðan prís- og lønarvøkstur í mesta lagi kr. 26 mió sbrt. kostnaðarmeting, j.nr. 21/03920-14.

- Loyvir Føroya Arena at staðseta stórhøllina sambært kortskjali, j. nr. 21/03920, og veitir lendið undir høllini sum stovnandi fæ umframt trygd fyri brúksavtalu um parkeringsøkið til høllina.

**Fíggjarnevndin 22. juni 2022:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson og Annika Olsen, tekur undir við at stovna Føroya Arena eftir omanfyrinevnda leisti og tekur undir við tilmælinum frá kommunustjóranum og trivnaðarstjóranum.

Málið beint í býráðið.

Ein minniluti, Elsa Berg, atkvøður blankt.

**Býráðsfundur 22. juni 2022:** Fyrst varð atkvøtt um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnvndini, ið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri, ongari ímói og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Jákup Dam, Gunvør Balle, Annika Olsen, Birgir Nielsen og Ruth Vang.

Blankt atkvøddi: Elsa Berg.

Býráðið valdi síðani hesar limir í nevndina fyri Føroya Arena:

Vegna meirilutan í býráðnum, Javnaðarflokkin og Sambandsflokkin: Heðin Mortensen, borgarstjóra, sum nevndarlim og Annfinn Brekkstein, varaborgarstjóra, sum varalim.

Vegna minnilutan í býráðnum, Tjóðveldi, Fólkaflokkin og Framsókn: Anniku Olsen sum nevndarlim og Gunvør Balle sum varalim.

Fyri Vinnuhúsið: Berg Poulsen sum nevndarlim og Ester Dahl sum varalim.

Fyri Visit Faroe Islands: Gurið Højgaard, stjóra, sum nevndarlim og Annleyg Lamhauge sum varalim.

Fyri ÍSF: Elin Heðinsdóttir Joensen, ÍSF-forseta, sum nevndarlim og John Kjær, ÍSF-starvsnevndarlim, sum varalim.

**Ískoyti:**
Nevndin fyri stórhøllina hevur ynski um at broyta viðtøkurnar, sum samtyktar vórðu í 2022.

Ein broyting er navnið á sjálvsognarstovninum, sum frameftir er Sjálvsognarstovnurin Við Tjarnir. Onnur broyting er nýggj grein §6 um heimild at seta stjóra fyri dagliga rakstrinum. Haraftrat er nýggj §7, har ásett verður, at ársfundur og skrá fyri hesum at verð hildin á hvørjum ári áðrenn 1. juli. Haraftrat er nýggj §10 um tekningarreglur.
Sí uppskotið.

Byggingin av høllini gongur væl, og væntast tikin í nýtslu nakað inn í februar 2025.
**Tilmæli:**
Kommunustjórin og trivnaðarstjórin mæla til at samtykkja viðtøkubroytingarnar fyri Sjálvsognarstovnin Við Tjarnir.

**Býráðsfundur 28. november 2024:** Einmælt samtykt.

FUNDURIN LOKIN KL. 19:15

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Heðin Mortensen | Annfinn Brekkstein | Tróndur Sigurðsson |
| Kári Johansen | Kristianna Winther Poulsen | Súna Mørk |
| Elsa Berg | Jákup Dam | Gunvør Balle |
| Annika Olsen | Birgir Nielsen | Súsanna Olsen |
| | Birita Baldvinsdóttir Iversen | |